

# Innihald


1 **Samandráttur** .......... 3
- Inngangur (kapittul 2) .......... 3
- Felags viðurskifti (kapittul 3) .......... 3
- Pedagogútbúgvingin (kapittul 4) .......... 4
- Læraraútbúgvingin (kapittul 5) .......... 4
- Lærustovnurin (kapittul 6) .......... 4

2 **Inngangur** .......... 5
2.1 Rák og krøv .......... 5
2.2 Átrokandi dagføringar .......... 6
- Dagføringar í pedagog- og læraraútbúgvingunum .......... 6

2.3 Útbúgvingar í øðrum londum .......... 7
- Pedagogútbúgvingar .......... 7
- Læraraútbúgvingarnar .......... 8

3 **Felags viðurskifti** .......... 9
3.1 Bólkaskipan: *bólkar*, *blokkar* og *kubbar* .......... 9
- Fyrimunir viðvíkjandi útbúgvingunum og hjá teimum lesandi .......... 10
- Fyrimunir viðvíkjandi lærarakreftum .......... 10
- Fyrimunir viðvíkjandi skeiðsvirksemi .......... 10

3.2 Undirvísingar- og arbeiðshættir .......... 11
- Undirvísing og læring .......... 11
- Arbeiðshættir .......... 12
- Verkætlanararbeiði .......... 12

3.3 Starvslæra .......... 13
3.4 Bachelorverkætlan .......... 14
3.5 Kunningartøkni (KT) í útbúgvingini .......... 14
3.6 Fjarundirvísing og sjálvlestur .......... 15
3.7 Upptøkutreytir, møtiskylda og skjalamappa .......... 15
3.8 Eftirmeting og royndarvirksemi .......... 16
3.9 Útbúgvingarsamstarv og avriksflutningur .......... 17
3.10 Útbúgvingarnevndir .......... 17

**4 Pedagogútbúgvingin ... 18**
4.1 Inngangur ... 18
▪ Pedagogfakligheitin ... 18
4.2 Høvuðslutir í broytingini ... 19
4.3 Endurskoðað pedagogútbúgving ... 20
▪ Endamál ... 20
▪ Skipan av lestrinum ... 20
▪ Eftirmeting ... 21
▪ Skipan av útbúgvingini í bólkar, blokkar og kubbar ... 22
4.4 Teir einstøku bólkarnir í pedagogútbúgvingini ... 22
▪ Bólkur 1: Námsfrøði/sálarfrøði bólkurin ... 22
▪ Bólkur 2: Samskifti og leiðsla ... 23
▪ Bólkur 3: Samfelagsbólkurin ... 24
▪ Bólkur 4: Mentanarbólkurin ... 25
▪ Bólkur 5: Starvslæran ... 27
▪ Bólkur 6: Bachelorbólkurin ... 29
4.5 Dømi um bólkabýti á árshálvur ... 30

**5 Læraraútbúgvingin ... 31**
5.1 Inngangur ... 31
5.2 Høvuðslutir í broytingini ... 32
5.3 Bólkabýtið ... 33
▪ Kravdir og valfríir útbúgvingarpartar ... 34
5.4 Teir einstøku bólkarnir í læraraútbúgvingini ... 35
▪ Bólkur 1: "At gerast lærari" ... 35
▪ Bólkur 2: Námsfrøði/sálarfrøði ... 36
▪ Bólkur 3: Føroyskt ... 36
▪ Bólkur 4: Linjugreinir ... 37
▪ Bólkur 5: Starvslæran ... 38
▪ Bólkur 6: Bachelorbólkurin ... 39
5.5 Dømi um bólkabýti á árshálvur ... 40

**6 Lærustovnurin ... 41**
6.1 Føroyskur lærdur háskúli ... 42
6.2 Førleikamenning ... 43
6.3 Gransking ... 43
6.4 Eftirútbúgvingardeild ... 44
6.5 Skiftisskipan ... 44
▪ Skiftisskipan fyri lærustovnin ... 44
▪ Uppstiging til bachelor ... 45
6.6 Kandidatútbúgvingar ... 45

SKJØL
1: Dømi um ein bólk í læraraútbúgvingini: Linjugreinin landalæra
2: Um læraraútbúgvingarnar í Norðurlondum
3: Tilvísingar til heimasíður við tilfari um lógir, kunngerðir o.a.
4: Limirnir í arbeiðsnevndini



# 1 Samandráttur

Her verður tikið saman um tær viðmerkingar og tey tilmæli viðvíkjandi nýggjum pedagog- og læraraútbúgvingum, sum nevndin setir fram í hesum áliti.

- **Inngangur** (kapittul 2)

Við teimum avbjóðingum, sum nútíðarsamfelagið býður bæði einstaklingum og samfelagnum sum heild, eiga skúli og útbúgving at raðfestast høgt. Alheimsgerð, kunningartøkni, miðlar, kapping og einstaklingstørvur seta krøv, ið eiga at síggjast aftur í teimum útbúgvingum, sum føroyskum ungdómi stendur í boði. Sæð í hesum ljósi hava ikki minst pedagog- og læraraútbúgvingar avgerandi týdning fyri siðmenningina og vitanarkervið í samfelagnum í síni heild. Fleiri og fleiri lond (m.o. Norðurlond) skipa hesar útbúgvingar sum universitetsútbúgvingar. Ynski er um at dagføra lógar- og kunngerðargrundarlagið fyri útbúgvingarnar og taka hædd fyri sonevndu Bologna-yvirlýsingini viðvíkjandi hægri útbúgvingum, sum flestu europeisku londini taka undir við.

- **Felags viðurskifti** (kapittul 3)

Víst verður á fleiri viðurskifti av bygnaðarligum slagi, sum útbúgvingarnar hava í felag, m.a. viðvíkjandi undirvísingarskipan, arbeiðsháttum, verkætlanum, upptøku og eftirmeting, havandi í huga, at tað er ein og sami lærustovnur – og tann einasti av sínum slagi í landinum – sum stendur fyri báðum útbúgvingunum. Til tess at skapa eind og samanhang í útbúgvingunum verður skotið upp at hava eina smidliga stigbýtta undirvísingarskipan (’bólkaskipan’) við longri samanhangandi tíðareindum; færri verkevni verða lisin samstundis, og størri smidleika verður hjá lærarum og lesandi. Onnur felags viðurskifti sum eitt nú starvslæra, bachelorverkætlan, kunningartøkni og fjarundirvísing eru eisini viðgjørd.

- **Pedagogútbúgvingin** (kapittul 4)

  Pedagogútbúgvingin verður sambært uppskotinum ein 4 ára granskingargrundað bachelorútbúgving, tilsamans 240 (=4x60) ECTS í vavi. Við fýra mánaða longdari lestrartíð verður rúm fyri meira hugdýping í tí ástøðiliga partinum, uttan at tikið verður av breiddini og uttan at skerja starvslærutíðina. Tann lesandi skal vinna sær neyðugan fakligan førleika, sum er í samsvari við samfelagsligu, vísindaligu og námsfrøðiligu menningina á økjum, har pedagogar starvast. Útbúgvingin verður framhaldandi ein eindarútbúgving, men bólkaskipanin gevur tí lesandi møguleika at nema sær ávísan serkunnleika. Pedagogútbúgvingin er býtt upp í hesar seks bólkar og samsvarandi ECTS-býti: *Námsfrøði/sálarfrøði* (60), *Samskifti og leiðsla* (15), *Samfelagsbólkur* (25), *Mentanarbólkur* (50), *Starvslæra* (60), *Bachelorbólkur* (30).

- **Læraraútbúgvingin** (kapittul 5)

  Lærarútbúgvingin verður sambært uppskotinum ein 4 ára granskingargrundað bachelorútbúgving, tilsamans 240 (=4x60) ECTS í vavi. Útbúgvingin skal geva teimum lesandi førleikar til at lúka krøvini, ið ásett eru í fólkaskúlalógini, tá talan er um persónlig, samfelagslig og sosial viðurskifti og ikki minst faklig, didaktisk og námsfrøðilig. Útbúgvingin skal geva teimum lesandi venjing í at leggja til rættis, samstarva, gjøgnumføra og eftirmeta undirvísing, umframt førleika til at granska, kveikja og seta í verk menningartiltøk. Størri fakligheit verður rokkin við fýra linjugreinum og færri felagsgreinum. Lærarútbúgvingin er býtt upp í hesar seks bólkar og samsvarandi ECTS-býti: *'At gerast lærari'* (20), *Námsfrøði/sálarfrøði* (25), *Føroyskt* (20), *Linjugreinir* (120=4x30), *Starvslæra* (25), *Bachelorbólkur* (30) .

- **Lærustovnurin** (kapittul 6)

  Til tess at røkka kravinum um, at útbúgvingarnar gerast granskingargrundaðar bachelor-útbúgvingar eigur ein framhaldandi førleikamenning av starvsfólkum at fara fram, eisini til tess at kunna bjóða fram kandidat- og masterútbúgvingar seinni. Ynski er um at skipa ein føroyskan lærdan háskúla, ið skal fevna um allar teir lærustovnar, ið bjóða út hægri útbúgvingar. Sum liður í hesum arbeiðir Mentamálaráðið við at orða eitt lógarverk fyri ein føroyskan lærdan háskúla, ið fer at fevna um Fróðskaparsetur Føroya, Sjúkrarøktar-frøðiskúli Føroya og Føroya Læraraskúla. Mælt verður til at skipa eina felags granskingarkvotuskipan, so lærarar á lærara- og sjúkrarøktarfrøðiskúlanum fáa høvi til at arbeiða við granskingaruppgávum.

☐



# 2 Inngangur

## 2.1 Rák og krøv

Nútíðarsamfelagið setur vaksandi krøv til hin einstaka á so mongum økjum, ikki minst tá ið tað snýr seg um vitan, útbúgving og siðmenning. Sæð í hesum ljósi eru stovnar og skúlar hornasteinar í samfelagnum, og tað er tí sera umráðandi, at pedagog- og lærara-útbúgvingarnar eru relevantar, skilt soleiðis, at pedagog- og læraralesandi verða fyrireikaðir at liva upp til krøv og til at loysa uppgávur, sum samfelagið setur stovnum og skúlum við at seta fokus á eitt nú fakligheit, undirvísingarførleikar, smidleika, broytingarvilja, nýskapan (innovatión) og valmøguleikar.

Bæði einstaklingar og samfelagið í sini heild vera fyri stórum avbjóðingum vegna m.a. alheimsgerð, kunningartøkni, miðlar, kapping og individualisering. Vaksandi krøv verða sett til útbúgvingarskipanina og ikki minst fakligheitina. Skulu vit sum samfelag fylgja við í menningini og kunna sammeta okkum við onnur framkomin lond, noyðast vit at raðfesta útbúgving høgt. Við alheimsgerðini verður – eisini í føroyskum stovnum og skúlum – størri fjølbroytni í lívsáskoðanum, lívsstíli, máli o.s.fr. Hesi viðurskifti hava sínar fyrimunir, men eru samstundis ein avbjóðing, sum eigur at síggjast aftur í útbúgvingunum.

Tey ungu ferðast nógv í dag, og mong teirra lesa partar av útbúgvingum sínum í øðrum londum. Tað setur onnur og broytt krøv til upptøkumannagongdir, lestrargóðskrivingar (merit) o.a. Eisini koma lesandi, ið ikki skilja føroyskt, henda vegin, og tað setur nýggj málslig krøv til útbúgvingarnar og undirvísingina. Hetta merkir, at lærustovnurin má hava eitt altjóða perspektiv við í sínum virki.

Nýggja kunningartøknin og ikki minst økta miðlaávirkanin og miðlanýtslan millum ung seta krøv til komandi pedagogar og lærarar. Teir skulu duga at síggja og brúka fyrimunirnar við nýggjari tøkni, men eisini reflektera kritiskt um nýtsluna av henni.

Økt kapping, ikki minst á arbeiðsmarknaðinum, og individualisering eyðkenna tíðina. Hetta gevur fyrimunir fyri mong, men kann eisini vera ein bági fyri tey, sum ikki sjálv megna at fylgja við. Stovnar og skúlar eiga tí at syrgja fyri, at bestu útbúgvingar- og menningarmøguleikar skulu standa øllum í boði.

## 2.2 Átrokandi dagføringar

Nevndu viðurskifti, og onnur við, tala fyri eini dagføring av lógar- og kunngerðargrundarlagnum fyri lærara- og pedagogútbúgvingunum. Men harumframt eigur eisini Bologna-yvirlýsingin at nevnast. Bologna-yvirlýsingin frá 1999 hevur til endamáls at tryggja, at útbúgvingarnar bygnaðarliga verða einsháttaðar, og harvið kunnu samanberast, og at ávís mál verða sett fyri útbúgvingunum. Yvirlýsingin hevur m.a. við sær, at londini nýta trý felags heiti fyri akademiskar útbúgvingar: BA (BS) á 3 ár (bachelorútbúgving) + MA (MS) á 2 ár (master-/kandidatútbúgving) + ph.d. á 3 ár (granskararútbúgving). Hetta verður mett sum eitt hent amboð, tá ið okkara hægru útbúgvingar skulu nýtast uttanlands. Við yvirlýsingini kann væntast eitt betri grundarlag fyri at økja um samstarvið landanna millum við dygdarmenning og eftirmetingum.

Ein partur av Bologna-yvirlýsingini snýr seg um ECTS, sum er stytting fyri European Credit Transfer System. ECTS-stigini lýsa tað arbeiðið, sum verður kravt av tí lesandi viðvíkjandi luttøku í undirvísingini, fyrireiking, uppgávum, próvtøkum v.m. ECTS-stig verða ásett fyri hvørja einstaka námsgrein (skeið, verkætlan o.a.) til tess at lýsa tað samlaða avrikið, sum er mett neyðugt til at standa hesa námsgrein.

Eitt lestrarár fevnir um 60 ECTS (t.d. 6 námsgreinir, sum hvør telur 10 ECTS). ECTS-stig lýsa eitt lutfalsligt virði: tað er hvør lærustovnur sær, ið ger av, hvussu nógv stig verða tengd at hvørjari námsgrein; tað eru teir ymisku lærustovnarnir, ið áseta ECTS-stigini, og ikki ein felags, hægri myndugleiki. Í Føroyum eru Fróðskaparsetur Føroya og Sjúkraröktarfrøðiskúli Føroya farnir undir at tilluta skeiðunum ECTS-stig.

Bologna-yvirlýsingin er ein semja millum flestu europeisku londini um, at akademisku útbúgvingarnar í hesum londum skulu bygnaðarliga harmoniserast eftir einum felagsleisti. Í Føroyum er politiskt ynski um at fylgja hesi europeisku harmonisering.

### Dagføringar í pedagog- og læraraútbúgvingunum

Sambært uppskotinum til nýggja pedagog- og læraraútbúgving verða báðar 4 ára langar yrkisrættaðar útbúgvingar á bachelorstigi. Sostatt fer læraraútbúgvingin at hava somu longd sum í dag, meðan pedagogútbúgvingin verður longd við einum lítlum hálvári. Útbúgvingarnar, ið telja 240 ECTS, taka støði bæði í eini ástøðiligari, vísindaligari og praktiskari, yrkisligari fatan. Ein bachelorútbúgving er vanliga 3 ár til longdar, t.e. 180 ECTS, men av tí at hesar útbúgvingarnar eru yrkisrættaðar og hava ein praktiskan part, har lesandi eisini eru í starvslæru, verða útbúgvingarnar eitt lestrarár longri enn vanligar bachelorútbúgvingar.

Útbúgvingarnar verða býttar sundur í 8 lestrarhálvur, og lærustovnurin hevur ábyrgdina av at samskipa praktiska og ástøðiliga partin av undirvísingini í eina samanhangandi útbúgvingartilgongd.

Útbúgvingarnar skula lagast til tørvin í Føroyum, men eisini geva útbúnum pedagogum og lærarum møguleika at virka uttanlands og at fara undir framhaldslestur við somu møguleikum sum pedagogar og lærarar, ið eru útbúnir í øðrum londum. Við hesum endamáli verða bæði vísindaligi, ástøðiligi og praktiski parturin eins týdningarmiklir. Praktiski og teoretiski parturin verða samskipaðir soleiðis, at endamálið, ið er at gera tey lesandi førar fyri at virka á viðkomandi stovnum og skúlum, verður rokkið.

Rammulóg verður skrivað fyri pedagogútbúgvingina og læraraútbúgvingina hvør sær. Felags fyri báðar rammulógirnar eru tey viðurskifti, ið viðvíkja stovninum, meðan tað, ið hoyrir útbúgvingunum til, verður serstakt fyri hvørja lóg.

Somuleiðis skulu tvær høvuðskunngerðir, ein fyri hvørja útbúgving, skipa viðurskiftini viðvíkjandi innihaldi, próvtøkuskipan, viðurskifti hjá lesandi, kærumøguleikum o.ø. Við støði í lógunum, kunngerðunum o.ø. skal lærustovnurin gera eina námsskipan fyri hvørja útbúgving sær, sum ítøkiliga lýsir innihaldið og onnur viðurskifti í útbúgvingini. Landsstýrismaðurin í mentamálum skal góðkenna námsskipanina.

Í arbeiðnum við nýggju føroysku pedagog- og læraraútbúgvingunum hava vit fyri ein part latið okkum inspirerað av tilsvarandi norðurlendsku útbúgvingunum, tó at uppskotið til føroysku útbúgvingarnar í stóran mun er lagað til okkara viðurskifti.

## 2.3 Útbúgvingar í øðrum londum

Í grannalondum okkara eru pedagog- og læraraútbúgvingar sum heild skipaðar sum bachelor- og kandidatútbúgvingar frá universitetum og hægri lærustovnum. Í Danmark eru útbúgvingarnar á bachelorstigi, og undirvísingin er á seminarium, ið eru partar av teimum sokallaðu CVU-deplunum (Center for videregående uddannelser), har fleiri lærustovnar hava skipað seg í størri eindir hesi seinnu árini.

Viðmerkingarnar niðanfyri byggja á samanberingar av pedagog- og læraraútbúgvingunum í Norðurlondum (sí skjal 2).

- **Pedagogútbúgvingar**

Í nevndu londum eru pedagogútbúgvingarnar nógv meira ymisligar enn læraraútbúgvingarnar. Pedagogútbúgvingarnar venda sær móti ymiskum avmarkaðum pørtum av breiða arbeiðsøkinum, sum pedagogar í Føroyum og Danmark verða útbúnir til.

Í stóran mun er talan um spesialiseringar til ávís øki, t.d. normaløkið ella sosialpedagogiska økið, meðan útbúgvingin í Føroyum og Danmark meira er ein generalistútbúgving.

Afturat hesum kemur, at útbúgvingarnar eru á ymiskum støði, frá at vera ein miðnámsútbúgving summastaðni til kandidatútbúgving aðrastaðni.

## LærarAútbúgvingarnar

LærarAútbúgvingarnar í nevndu londum eru eisini ógvuliga ymiskar. Stóru munirnir í fólkaskúlabygnaðinum í ymsum londum við “primary school” (1.–4./6. flokk) og “lower secondary school” (4./6.–9. flokk) speglast aftur í ymiskum læraraútbúgvingum, v.ø.o. geva læraraútbúgvingarnar har bert førleika at undirvísa á ávísum floksstigum.

Í flestu londunum hava lærararnir á lægru floksstigunum “primary school” ein breiðan undirvísingarførleika. Á “lower secondary”-floksstigunum serútbúgva lærarar seg í færri lærugreinum ella lærugreinaøkjum. Tað er eitt sindur ymiskt úr einum landi í annað, hvussu nógvar lærugreinirnar eru, men vanliga 2-3 lærugreinir. Í Føroyum, Danmark og Noregi er læraraútbúgvingin ein eindarútbúgving, har lærarin kann undirvísa 1.-10. flokkunum.

Fylgiskjal 2 lýsir í stuttum nøkur eyðkenni fyri læraraútbúgvingarnar í áður nevndu londunum (Íslandi, Noregi, Svøríki, Finnlandi, Niðurlondum og Eysturríki). Eyðkennini eru:

- grund- og miðnámsskúli
- stovnur, har lærarar verða útbúnir
- longd á útbúgving
- undirvísingarførleiki
- starvslæra í útbúgvingini

☐



# 3 Felags viðurskifti

Í hesum kapitli verða teir tættir viðgjørdir, ið pedagog- og læraraútbúgvingarnar hava í felag, m.a. viðvíkjandi undirvísingarskipan, arbeiðsháttum, verkætlanum, upptøku og eftirmeting. Tað er ikki nógv undirvísing, sum útbúgvingarnar hava í felag sum so, men kortini er talan um fleiri viðurskifti av skipanarligum slagi, sum hava gildi fyri báðar útbúgvingar; eisini tí, at tað er ein og sami lærustovnur, sum stendur fyri báðum útbúgvingunum.

## 3.1 Bólkaskipan: *bólkar, blokkar* og *kubbar*

Til tess at skapa eind og samanhang í pedagog- og læraraútbúgvingunum er ætlanin at skipa undirvísingina í longri samanhangandi tíðareindir og samstundis fækka talið av lærugreinum. Skotið verður upp at skipa undirvísingina í "bólkar", "blokkar" og "kubbar", ið hanga saman sum víst á myndini.

***Stigbýtt undirvísingarskipan***




Talan er um eina stigbýtta (hierarkiska) skipan, har ein bólkur er settur saman av nøkrum blokkum, og ein blokkur kann so aftur verða settur saman av fleiri kubbum. Heitini fastleggja ikki arbeiðsháttin innan fyri hvørja tíðareind. Lagt verður upp til, at ymiskir arbeiðshættir sum t.d. fyrilestrar, floksundirvísing, venjingar og ikki minst verkætlanar-arbeiði verða nýttir.

Útbúgvingarnar verða soleiðis skipaðar í samanhangandi, tíðaravmarkaðar eindir. Bólkar, blokkar og kubbar verða at seta saman á ein slíkan hátt, at teir fylgja eini miðvísari ætlan, og hvør teirra við greiðum fakligum málum og allýstum innihaldi. Hvør bólkur, blokkur og kubbi skal kunna eftirmetast.

Fylgiskjal 3 vísir eitt dømi um ein bólk (linjulestur á læraraútbúgvingini) og teir blokkar og kubbar, ið hann er settur saman av.

- **Fyrimunir viðvíkjandi útbúgvingunum og hjá teimum lesandi**

Til ber at áseta, hvørjir bólkar, blokkar og kubbar eru ella kunnu vera felags fyri báðar útbúgvingarnar, og hvørjir eru serstakir fyri ta einstøku útbúgvingina.

Tað gerst lættari at broyta ella tillaga innihaldið í viðkomandi útbúgving eftir tørvi. Skipanin er sostatt løtt at broyta, og gevur hetta eina sera smidliga útbúgving, sum støðugt kann laga seg til broytt krøv. Á henda hátt kunnu útbúgvingarnar røkka teimum krøvum, sum nútíðarsamfelagið setur. Møguleikin verður størri at fara í dýpdina yvir longri tíðarskeið við ávísum evnum og spurningum.

Báðar útbúgvingarnar gerast meira smidligar soleiðis at skilja, at tað í ávísan mun ber til hjá tí lesandi at seta dám á sín egna lestur t.d. eftir áhuga ella til tess at nema sær ein ávísan serkunnleika.

Skipanin gevur størri gjøgnumskygni og møguleika, um tann lesandi ætlar at skifta til annan lesnað, og hon gevur betri møguleikar at leggja til rættis enn núverandi tímabýtta undirvísingarskipan.

- **Fyrimunir viðvíkjandi lærarakreftum**

Í sambandi við at gagnnýta tær ymisku lærarakreftirnar á besta hátt, kann skipanin geva skúlanum fleiri møguleikar og smidleika, m.a. við at lærarar ikki eru knýttir at ávísum flokkum og somu tímatalvu alt árið. Tí kann lærari undirvísa nógv eitt ávíst tíðarskeið og soleiðis skapa sær rúm fyri øðrum uppgávum, t.d. gransking ella eftirútbúgving onnur tíðarskeið.

Skipanin gevur lærustovninum størri møguleikar at víðka um førleikapartin, tí at tað ber til at fáa lærarar uttan fyri lærustovnin – bæði í Føroyum og uttanlands – at skipa fyri og møguliga hava ábyrgd av ávísum bólkum, blokkum ella kubbum.

- **Fyrimunir viðvíkjandi skeiðsvirksemi**

Bólkaskipanin gevur fyrimunir, tá ið lærustovnurin skal bjóða út skeið til eftir- og víðari útbúgving.

Við skipanini verður hædd tikin fyri støðugari eftirútbúgving av lærarum og pedagogum, tí at ráðlegging í góðari tíð av bólkum, blokkum ella kubbum gevur møguleika fyri, at

útbúnir lærarar og pedagogar í vinnu kunnu melda seg til ein ávísan bólk, blokk ella kubba, bæði sum liður í eini førleikagevandi ætlan ella sum eitt áhugaskeið.

Hetta gevur møguleika fyri alla tíðina at víðka um útbúgvingina og samstundis skipa fyri eini eftirútbúgving, ið er lagað til tørvin í einum støðugt broytiligum samfelagi.

## 3.2 Undirvísingar- og arbeiðshættir

### Undirvísing og læring

Fakligur førleiki er bæði grundarlagið av vitan, sum er neyðug í nútíðarsamfelagnum, og førleikin at ogna sær amboðini at fáa sær hesa vitan, at duga at meta um og avgera, hvør vitan er umráðandi og nýtilig. Her verður tosað um fakligan førleika í nógv víðari týdningi enn paratvitanin í skúlanum, tí her er talan um brúksførleika, og í hesum førleika liggur eisini førleikin at læra fyri lívið ella lívslong læring, t.e. at læra at læra.

Læring vísir á eina virkna gongd, har vit sum lærandi sjálv menna okkara førleikar. Læring fer fram í einum sosialum og mentanarligum samanhangi og hevur tær bestu umstøðurnar, tá ið tann lærandi er virkin, er motiveraður og hevur góðan møguleika at ávirka málið, innihaldið og gongdina í læringini. Samstundis skal læringin hjá hvørjum lesandi sær møta avbjóðingum í teimum krøvum, sum útbúgvingarkunngerð og námsskipan seta. Læringin víðkast og mýkist, við tað at vitan, kunnleiki, áskoðanir og gerðir renna saman hjá lesandi og lærarum.

Í undirvísingini eigur tann lærandi sjálvur og í samstarvi við onnur at

- broyta informatión til vitan
- kanna og skilja aktuella veruleikan og aktuellu verðina
- skilja, skifta orð um og taka støðu til virði, bæði annara og egin
- læra at kanna og skilja, hvussu vit kunnu ávirka tað, sum hendir rundan um okkum
- víðari- og eftirútbúgva seg.

Tað er og verður av støðugt størri týdningi, at útbúgvingar leggja størri dent á undirvísingar- og arbeiðshættir, ið stuðla undir, at tann lesandi lærir í felagsskapi við onnur og gerst tryggur við hugsanina, at vit læra fyri lívið.

Í útbúgvingini skulu vera undirvísingar- og arbeiðshættir, sum stuðla førleikamenningini hjá tí lesandi í mun til læring, sjálvstøðu og samarbeiði og til at skapa fakliga endurnýggjan. Arbeitt eigur at vera tvørtur um fak, og um til ber eisini tvørtur um aldursmørk/flokkar. Í útbúgvingunum kunnu tvørfakligir partar vera við bæði í tí ástøðiligu og starvsligu undirvísingini. Tvørfakligir partar skulu leggjast til rættis í samstarvi við teir samstarvspartar, sum eru viðkomandi fyri yrkisbólkin.

Undirvísingin skal fevna um eina sosiala, eina fakliga og eina persónliga dimensjón, virðisfatan og medábyrgd. Eisini eigur at vera hugsað um tað alment menniskjansliga.

Undirvísingin skal

- taka støði í tí lesandi, t.e. at taka støði í gerandislívi, medviti og royndum hjá tí lesandi, samstundis sum at fyrilit verða tikin fyri tørvi, fortreytum og møguleikum hjá tí lesandi
- vera ígongdsetandi og stuðla uppundir, at tann lesandi er aktivur í egnum lærugongdum. Ein lærari kann undirvísa tí lesandi; men sjálv læringin fer fram í tí lesandi sjálvum. Alt hetta krevur, at tann lesandi er við og virkin í undirvísingini
- vera avbjóðandi. Læringin skal bæði seta krøv og vera áhugaverd. Læring krevur arbeiði og ber við sær, at tað verða gjørd mistøk og feilir, og at mistøk og feilir verða rættað
- vera sosialt skipað. Partar av læringini skulu verða sosialt skipaðir. Viðhvørt læra vit best einsamøll, viðhvørt í bólki, viðhvørt tvey og tvey. Øll góð læring tekur fyrilit fyri at skifta ímillum. Tað er stimbrandi at læra saman við øðrum. Lívsførleikin verður best vandur og praktiseraður í bólkum og øðrum sosialum samanhangum
- vera granskingargrundað. Í undirvísingini skulu nýtast granskingarúrslit hjá einstøkum londum og altjóðagransking á pedagog- og læraraøkinum og øðrum fakøkjum, sum eru viðkomandi fyri ávikavist pedagog- og lærarayrkið.

## Arbeiðshættir

Til tess at taka hædd fyri, at teir lesandi við ymiskum læringarstíli fáa gagn av undirvísingini, eiga arbeiðshættirnir at vera fjølbroyttir, og harvið geva tí lesandi møguleika at nýta fleiri av sínum vitsevnum (intelligens). Best er at skifta millum ymiskar arbeiðshættir t.d. fyrilestrar, vanliga floksundirvísing, verkstaðararbeiði, evnisarbeiði og verkætlanararbeiði. Leikluturin hjá lærarunum verður eisini fjøltáttaður og kemur at fevna bæði um tann meira klassiska læraraleiklutin og tann leiklutin, har lærarin leiðbeinir, ráðgevur, virkar sum venjari, sparringsfelagi og opponentur og til tann, sum fakliga metir um og dømir uppgávur og verkætlanir.

## Verkætlanararbeiði

Sum dømi um ein týðandi arbeiðshátt kann verkætlanararbeiði nevnast. Hesin arbeiðsháttur setir krøv um at vera virkin og taka ábyrgd, og hann hóskar væl til hugsanina, at læring er ein virkin tilgongd, og at vitan og førleikar eru nakað, ið ein hevur ávirkan á, og á virknan hátt ognar sær.

Ein verkætlan er ein uppgáva, ið skal loysast innan ávíst tíðarskeið. Verkætlanararbeiði í undirvísingarhøpi er ofta eyðkent við, at

- taka støði í spurningum, sum eru viðkomandi fyri tann lesandi,
- arbeiðsgongdin í stóran mun er stýrd av tí lesandi sjálvum,
- arbeiðið endar við einum ítøkiligum avriki.

Tá ið arbeitt verður við verkætlanum, minnir hetta nógv um arbeiðslagið í samfelagnum annars, og nógvir av teimum førleikum, sum eru eftirspurdir í nútíðarsamfelagnum, verða mentir við verkætlanararbeiði. Somuleiðis hevur tann lesandi góðar møguleikar at ávirka

tað, sum arbeitt verður við. Hetta økir áhugan fyri arbeiðnum, og eggjar hann til at vera meira virkin.

Neyðugt er, at tann lesandi hevur eina grundleggjandi fakliga vitan um tað, sum arbeiðast skal við, eins og neyðugu persónligu førleikarnar og arbeiðsamboðini. Verkætlanararbeiðið krevur, at tann lesandi miðvíst venur seg við arbeiðsháttin í allari útbúgvingarskipanini.

Verkætlanararbeiði gevur góðar møguleikar fyri tvørfakligum samstarvi. Tvørfakligt samstarv skapar størri heildarfatan og samanhang í útbúgvingini. Verkætlanararbeiði gevur eisini størri møguleikar at skapa samband við vinnulívið og samfelagið sum heild, og á tann hátt samhugsa skúlalív og lívið uttan fyri skúlan.

## 3.3 Starvslæra

Endamálið við starvsligu undirvísingini er at fáa samband millum starvsliga og ástøðiliga partin av útbúgvingini. Fyri at tryggja sínámillum ávirkan og samband millum ástøðiliga og starvsliga partin verða útbúgvingarnar lagdar til rættis í mun til høvuðspartarnar av virkisøkinum hjá ávíkavist pedagoginum og læraranum. Ástøðiliga og starvsliga undirvísingin í fakøkjunum skal til eina og hvørja tíð tryggja samanspæl millum virði og kunnskap í viðkomandi útbúgving og yrki og samstundis tryggja, at vitanarstøðið í útbúgvingini endurspeglar menningina innan yrkið.

Starvsligi parturin fer fram á góðkendum starvslærustøðum innan viðkomandi øki, innanella uttanlands. Vegleiðingin/undirvísingin, sum tann lesandi fær á starvslærustaðnum, eigur at veitast av starvsfólki, ið hevur neyðugan førleika. Fyri at verða *starvslærulærari,* krevst starvslærulæraraskeið. Ein onnur treyt fyri at hava lesandi í starvslæru er, at starvslærulærarin hevur pedagog- ella læraraútbúgving og minst 2 ára starvsroyndir. Lærustovnurin vegleiðir starvslærustøðini um tilrættisleggingina av vegleiðingini. Starvslærustøðini gera í samráð við lærustovnin eina undirvísingarætlan. Lærustovnurin samskipar starvslæruna og góðkennir starvslærustøðini.

Lesandi fáa stuðul frá Stuðulsstovninum undir allari útbúgvingini. Hetta staðfestir, at bæði í starvsliga og ástøðiliga partinum er tann lesandi í útbúgving og er ikki ein normeraður partur av arbeiðsorkuni á starvslærustaðnum.

Lærustovnurin eigur at hava skyldu til at veita starvslærulæraranum neyðugan førleika, t.d. við skeiðstilboðum, eftirútbúgving o.ø. Starvslærulæraraútbúgvingin fevnir um á leið ¼ ársverk og endar við próvtøku.

## 3.4 Bachelorverkætlan

Bachelorverkætlanin er 20 ECTS í vavi og verður í høvuðsheitum arbeitt við henni í 8. lestrarhálvu. Í báðum útbúgvingum er verkætlanin partur í sonevnda bachelorbólkinum, har eisini vísindaástøði og háttalagslæra verða lisin við tilsamans 10 ECTS í vavi.

Bachelorverkætlanin er skrivlig við eini munnligari framløgu og kann skipast sum ein einstaklings- ella bólkaverkætlan. Próvtøkuhátturin skal leggja upp fyri endamálinum við útbúgvingini og tryggja, at dømingin verður framd fyri hvønn einstakan lesandi sær. Tann lesandi velur í samráði við vegleiðara verkevni, sum endaliga skal góðkennast av leiðsluni.

Bachelorverkætlanin skal vera viðkomandi fyri útbúgvingarheildina. Á pedagog-útbúgvingini eigur hon at verða knýtt at kjarnupedagogførleikanum: refleksiónir um at fara í relatión við onnur menniskju undir ymiskum professionellum umstøðum. Á læraraútbúgvingini eigur hon at knýta fakfakligheit, didaktikk/námsfrøði/sálarfrøði og møguliga starvslæru saman í eina eind og samstundis líta frameftir móti praktiska yrkinum sum lærari. Meginætlanin við bachelorverkætlanini er, at hon skal vera við til at:

- skapa eind í útbúgvingina og savna ymsu træðirnar
- geva møguleika at fordjúpa seg í relevantum viðurskiftum
- prógva evni at nýta vísindalig ástøði og háttalag

Vegleiðarar eru lærarar í viðkomandi lærugreinunum, umframt møguligan uttanhýsis ráðgeva. Uppgávan verður dømd av vegleiðara/vegleiðarum og uttanhýsis próvdómara/-próvdómarum, sum Mentamálaráðið setir. Uppgávan verður dømd eftir galdandi próvtalsstiga.

## 3.5 Kunningartøkni (KT) í útbúgvingini

At duga at lesa, skriva og rokna hevur vanliga verið roknað sum teir grundleggjandi mentanarførleikarnir, tí hetta eru førleikar, sum vit øll hava brúk fyri í flest øllum lívsins viðurskiftum. Men seinnu árini er kunningartøkni (KT) vorðin so avgerandi partur av lívinum hjá teimum flestu, ið hvussu er í vesturheiminum, at KT má roknast sum ein fjórði mentanarførleiki. Hetta eigur at síggjast aftur í pedagog- og læraraútbúgvingunum, og seyra gjøgnum allar partar av útbúgvingunum.

Í læraraútbúgvingini er hetta staðfest við kravdum KT-skeiði fyri allar lesandi í bólkinum ‘At gerast lærari’, umframt møguleikanum at velja KT sum linjugrein; bæði skeið og linjugrein við námsfrøðiligum og tøkniligum innihaldi.

Í pedagogútbúgvingini verður kravda KT-skeiðið partur av bólkinum ‘Samskifti og leiðsla’.

Men umframt undirvísing *í* KT, skal undirvísast *við* KT í øllum lærugreinum, so at kunningartøknin gerst natúrligur partur av útbúgvingunum. Hetta krevur av lærustovninum, at tøknin er tøk í nóg stóran mun, og samstundis eina stovnsmentan við jaligum hugburði til KT. Samstundis eiga starvsfólk á stovninum at fáa eftirútbúgving í KT, so til ber at røkka nevndu málum.

## 3.6 Fjarundirvísing og sjálvlestur

Seinastu árini er tað vorðið alt vanligari, at fólk ynskja ein størri smidleika í sambandi við lestur og útbúgving, og m.a. at kunna taka lestrarpartar ella heilar útbúgvingar sum fjarundirvísing og sjálvlestur. Og samskiftis- og kunningartøknin gera eisini sítt til, at hetta ber til í størri mun enn fyrr. Uttanlands koma hópin av fjarundirvísingartilboðum undan kavi, og sum vera man, hava hesi tilboð áhuga hjá mongum í Føroyum. Hesir møguleikar verða brúktir í vaksandi mun, og hvørki málsliga ella mentanarliga eru álvarsligar forðingar fyri hesum.

Í Danmark finnast nú tilboð um at taka pedagog- og læraraútbúgving sum fjarlestur, og í løtuni er ein bólkur av fjarlesandi í Føroyum, sum lesur til pedagog í Danmark. Mett verður, at stóra undirtøkan fyri hesi fjarundirvísing í stóran mun hevur samband við, at bert ein pedagogflokkur verður tikin inn á Føroya Læraraskúla um árið. Nógv fleiri søkja um at lesa til pedagog, enn pláss er fyri, og tann eini flokkurin røkkur ikki til tann vaksandi tørvin á útlærdum pedagogum, sum er á stovnum kring landið.

Í Føroyum er higartil lítið gjørt við at menna og bjóða møguleikar til fjarundirvísing. Allar royndir benda á, at tað er kostnaðarmikið og tíðar- og orkukrevjandi at menna fjarundirvísingartilboð. Vanlig floksundirvísing og bólkaarbeiði kunnu ikki í einum handarbragdi leggjast um til fjarundirvísing. Hóast tøknin er hent, so krevst fitt av fyrireiking at leggja tílíka undirvísing til rættis og at veita ta persónligu leiðbeining, sum tann lesandi væntar sær.

Til tess at koma longri ávegis við fjarundirvísingarspurningum, eigur orka at verða sett av til at menna heimligar loysnir á hesum øki.

## 3.7 Upptøkutreytir, møtiskylda og skjalamappa

Formliga upptøkukravið til umsøkjara, bæði til pedagog- og læraraútbúgvingina, er prógv frá studenta-, HF- ella tilsvarandi miðnámsútbúgving, tó skal í serligum førum frávik kunna gerast frá hesum reglum.

Møtiskylda verður fyri partar av pedagog- og læraraútbúgvingini og luttøkuskylda fyri aðrar. Møtiskylda er til alla starvslæru, fundir o.a. í sambandi við starvslæruna, til starvslæruframløgur og -eftirmetingar, til verkætlanarvikur og kravd skeið og partar av útbúgvingarbólkum.

Luttøkuskylda er fyri teir partar av útbúgvingini, har møtiskyldan ikki er galdandi. Luttøkuskylda merkir, at tann lesandi virkin skal taka lut í undirvísingini, t.e. at tann lesandi tekur á seg uppgávur í sambandi við fyrilestrar/upplegg, framløgur, luttøku í bólkaarbeiðum, venjingum og tílíkum, lata skrivlig avrik frá sær rættstundis o.s.fr. Harumframt skal tann lesandi gera eina *skjalamappu* (portefølje), ið kann nýtast sum amboð í sambandi við luttøkuskyldu og eftirmeting.

Í skjalamappuni, sum fylgir tí einstaka lesandi gjøgnum útbúgvingina, eiga eisini smærri royndir og uppgávur at verða goymdar. Hetta gevur bæði tí lesandi og lærara góðar møguleikar at fylgja við útbúgvingargongdini hjá tí einstaka, bæði viðvíkjandi úrtøku, menning o.ø.

Reglugerð um viðurskifti um upptøku, møti- og luttøkuskyldu v.m. verður gjørd.

## 3.8 Eftirmeting og royndarvirksemi

Útbúgvingarnar eiga at hava fjølbroyttar eftirmetingar- og royndar-/próvtøkuhættir. Royndir og próvtøkur skulu vera bæði við innanhýsis og/ella uttanhýsis próvdómara. Lærustovnurin kann í námsskipanini áseta, nær royndirnar við innanhýsis og/ella uttanhýsis próvdómara verða. Tó liggur fast, at bachelorverkætlanin skal dømast við uttanhýsis próvdómara.

Bachelorverkætlanin verður, við grundarlagi í skrivliga verkætlanaravrikinum, dømd við eini munnligari roynd, og eitt samlað próvtal verður givið fyri tað skrivliga og munnliga avrikið. Tann lesandi skal hava staðið allar aðrar royndir, áðrenn bachelorverkætlanin kann dømast endaliga. Starvslæruskeiðini kunnu verða dømd við innanhýsis eftirmetingum og royndum.

Áðrenn ein eftirmeting byrjar, verður ein eftirmetingarætlan gjørd, har m.a. ásett verður, hvat eftirmetingin skal fevna um, hvussu hon verður framd, hvør skal gera hana, og hvørji eftirmetingaramboð skulu nýtast, t.d. skjalamappan, spurnabløð, royndir, samrøður og annað. Eisini eigur støða at vera tikin til, hvat eftirmetingin skal nýtast til, og hvussu úrslitini av eftirmetingini verða tulkað ella løgd fram.

Ein eftirmeting skal hava støði í settum málum og eyðkennum fyri tað góða avrikið. Eftirmetingin skal lýsa, í hvønn mun mál og eyðkenni fyri tað góða avrikið eru rokkin. Tess neyvari og greiðari mál og eyðkenni fyri tað góða avrikið eru, tess lættari er at taka avgerð um, hvat skal eftirmetast. Eftirmetingin eigur ikki at fata um ov stór øki í senn, og tí eiga greiðar avmarkingar at gerast, áðrenn farið verður undir at eftirmeta.

## 3.9 Útbúgvingarsamstarv og avriksflutningur

Í Føroyum er bert ein skúli, ið veitir lærara- og pedagogútbúgving, og lutvíst fáir starvslærustovnar eru í landinum. Hetta ávirkar námsfrøðiliga fjølbroytni og kann skapa ávíst inerti. Tað hevur týdning fyri eina útbúgving at kunna vísa á, at aðrar loysnir eru, og at aðrir mátar eru at arbeiða uppá. Í teirri alheimsgerð vit liva í, hevur tað eisini avgerandi týdning at seta seg inn í útbúgvingarviðkomandi umstøður, hugsanir og fatanir í øðrum londum.

Tá talan er um fjølbroytni og íblástur í útbúgving og útbúgvingarmøguleikum, hevur eitt lítið samfelag sum tað føroyska fyrimunir av at samstarva við onnur lond. Eitt slíkt samstarv krevur, at vit eru til reiðar at taka ímóti lesandi uttaneftir, og at lesandi hiðani fara í útlond í styttri ella longri tíðarskeið at lesa partar av útbúgvingunum, á lestrarferðir o.s.fr. M.a. hevur Føroya Læraraskúli av og á havt útlendskar lesandi, serliga innan pedagogútbúgvingina, sum t.d. taka ein part av starvslæruni í Føroyum.

Skal tílíkt samstarv eydnast, er neyðugt, at greidleiki viðvíkjandi góðskriving er millum útbúgvingarstøðini við m.ø. avtalum og mannagondum í avriksflutningi. Eisini kann slíkt samstarv fevna um, at lærarar fara á stovnar hjá hvør øðrum at undirvísa, at fáa sær íblástur ella sum lið í eftirútbúgving.

Umráðandi er, at ætlanir viðvíkjandi samstarvi eru fyrireikaðar við kostnaðarmeting av ætlanini, og hvussu fíggingin fæst til vega. Tílíkar ætlanir skulu góðkennast av leiðsluni á lærustovninum, áðrenn lestrarskeiðið byrjar.

## 3.10 Útbúgvingarnevndir

Sum einasti lærustovnur í landinum við hesum útbúgvingum, sum samstundis eru rættaðar móti tveimum týðandi yrkisøkjum í samfelagnum, er neyðugt við støðugum samskifti við viðkomandi partar og framhaldandi eftirmeting av útbúgvingunum.

Til tess at røkja hesar uppgávur, eitt nú at fylgja við í virkseminum á lærustovninum, koma við ráðum og leiðbeining, sum hava til endamáls at menna stovnin, og til tess at tryggja, at útbúgvingarnar regluliga verða eftirmettar, verður mælt til at seta tvær útbúgvingarnevndir, eina fyri pedagog- og eina fyri læraraútbúgvingina. Útbúgvingarnevndirnar kunnu seta fram uppskot til broytingar í útbúgvingunum, menningarverkætlanir v.m., sum lærustovnurin tekur støðu til. Nevndin skal verða tikin upp á ráð, tá ið kunngerðir og rundskriv verða gjørd fyri útbúgvingarnar.

Útbúgvingarnevndirnar skulu hava breiða umboðan, t.d. við umboðum frá granskingar- og lærustovnum, starvslærustovnum, vinnuvirkjum og við fakligum umboðum. Í arbeiði sínum eiga nevndirnar eisini at hava samskifti við fakfólk og faklig umhvørvi í Norðurlondum/Europa til tess at fáa íblástur og fakliga vitan uttan úr heimi.

☐



# 4 Pedagogútbúgvingin

## 4.1 Inngangur

Síðani pedagogútbúgvingin varð sett á stovn í Føroyum, eru farnar fram umfatandi broytingar á tí pedagogiska økinum, og hvat pedagogurin skal duga. Mongdin av pedagoguppgávum tykjast vera í stórum vøkstri og sostatt eisini krøvini til bæði breiddina og dygdina í útbúgvingini. Av tí at arbeiðsøkið hjá pedagoginum er ætlað einum ógvuliga víðum og ymiskt skipaðum arbeiðsøki - bæði formliga og innihaldsliga - skal útbúgvingin geva førleikar, kunnleikar og fimi, ið kvalifisera til at arbeiða innan øll tey øki, sum pedagogútbúgvingin fevnir um.

Pedagogútbúgvingin er í síni grund ein generalistútbúgving, men í tí arbeiði, pedagogurin ger í praksis, er ofta ein umfatandi spesialisering neyðug. Tí eigur pedagogútbúgvingin at taka hædd fyri bæði einum almennum pedagogiskum parti, men eisini møguleikanum fyri spesialisering.

Tað er tískil eitt krav til útbúgvingina, at innihaldið í henni, lestrar- og arbeiðshættir endurspegla og medvirka til at tryggja sær, at tann lesandi fær innlit í víddina í pedagog-iskum arbeiði og samstundis førleika at fara í dýpdina í pedagogiskum arbeiðsháttum.

- **Pedagogfakligheitin**

Fakligi førleikin hjá pedagoginum er at arbeiða við menniskjum í øllum aldri, í øllum lívsskeiðum og við sera ymiskum fortreytum.

Kjarnin í pedagogfakligheitini er førleikin og evnini at praktisera "tað persónliga", "tað sosiala", "tað mentanarliga" og "tær sínámillum menniskjansligu relatiónirnar". Hetta er sjálvur kjarnin í virkseminum hjá pedagoginum og tískil eisini grundarlagið undir ástøðiliga lesnaðinum. Tað persónliga er førleikin hjá pedagoginum at brúka seg sjálvan sum amboð í pedagogiskum virksemi. Hetta krevur professionelt fakligt innlit saman við grundleggjandi menniskjaligum førleika. Tað sosiala er, at alt pedagogiskt virksemi er í

mun til onnur, tvs. í einum sosialum rúmi; og hesum má pedagogurin eisini taka hædd fyri í virki sínum. Tað persónliga og sosiala rúmið er myndað í einum mentanarligum og samfelagsligum umhvørvi, ið er ein treyt fyri pedagogiska virkinum. Men grundleggjandi fyri alla útbúgvingina er at duga at fara í eina relatión við onnur menniskju á øllum støði, við eini fatan av øllum teimum rúmum, henda relatiónin er treytað av.

Uttan mun til um málbólkurin er børn, ung, vaksin, normaløkið ella sosialpedagogiska økið, er arbeiðið hjá pedagoginum at skapa karmar um eina sera týdningarmikla samfelagsuppgávu, sum ber í sær: uppaling, dannilsi, menning, læring og lívsførleika. Hetta hevur við sær, at pedagogurin skal duga – sjálvstøðugt og saman við øðrum – at stuðla og stimbra emotionellu, sosialu, kognitivu, motorisku og málsligu menningina og læringina hjá málbólkinum.

Allar hesar uppgávur gera, at pedagogurin hevur ábyrgd av at menna eitt pedagogiskt rúm, ið er eyðkent av áhuga, engagementi, stuðli, vegleiðing, tryggleika og umsorgan.

Fyri at røkka hesum, skal pedagogurin hava m.a hesar kompetansur:

- Skapa professionellar relatiónir við barn/brúkara, ið tekur fyrilit fyri samleika og fortreytum hjá tí einstaka
- Skipa fyri og seta í verk tiltøk/aktivitetir, ið fær barnið/brúkaran at uppliva pedagogisku prosessina sum meiningsgevandi, áhugaverda og hugfangandi
- Leggja til rættis, seta í gongd, gjøgnumføra, reflektera yvir, dokumentera og evaluera eina pedagogisk gongd
- Greiða frá og grundgeva fyri vali av máli og metodum
- Greina og umhugsa sambandið millum pedagogisk mál og mið, seta tað í samband við egnan praksis – og praksis hjá øðrum - við tí í huga, um gongdin var nóg góð, ella um okkurt skal broytast
- Vegleiða og stuðla foreldrum og avvarðandi at børnum/brúkarum
- Arbeiða í toymi saman við øðrum fakbólkum og í mun til myndugleikarnar

Uppskotið til nýggja útbúgving skal tryggja pedagogfakligheitina og yrkisførleikan hjá komandi pedagogum, soleiðis at tey verða før fyri at átaka sær tær mongu ymisku arbeiðsuppgávurnar, ið pedagogiskt praksis fevnir um. Tað veri seg nú ella í framtíðini. Uppskotið skal eisini tryggja, at bachelorútbúgvingin verður ein fullgóður fyrsti partur í akademisku útbúgvingarskipanini.

Hetta gevur pedagogunum fakligan og ástøðiligan møguleika fyri at nema sær eftir- og víðariútbúgving í eini lívslangari læringstilgongd og eisini beinleiðis atgongd til víðari akademiska útbúgving.

## 4.2 Høvuðslutir í broytingini

Við uppskotinum til nýggja pedagogútbúgving á bachelorstøði verður útbúgvingin longd við 4 mánaðum. Útbúgvingin verður styrkt fakliga og verður meira liðilig, og sum ein granskingargrundað bachelorútbúgving verður hon á hægri stigi enn verandi útbúgving.

Fakligheitin verður styrkt bæði í tí ástøðiliga og starvsliga partinum av útbúgvingini. Verandi pedagogútbúgving er merkt av nógvum lærugreinum, sum ger tað trupult at koma í dýpdina við øllum (lærugreinum). Til tess at seta meira fokus á førleikar, ein útbúgvin pedagogur skal hava, er ynski um at skipa útbúgvingina í høvuðsbólkar ella høvuðsøki, har skeiðini (lærugreinirnar) hanga natúrliga saman, og har faklig mál, eins og ásetingar um fimi og vitan, verða sett fyri høvuðsøkið og einstøku skeiðini ella partarnar.

Liðiligheitin í útbúgvingini sæst serliga aftur í bólkaskipanini (sí kap. 3). Pedagog-útbúgvingin verður framhaldandi ein eindarútbúgving, men bólkaskipanin gevur tí lesandi møguleika at nema sær ávísan serkunnleika, og ger tað lættari at lesa part av útbúgvingini uttanlands ella møguliga skifta lesnað, um ynski er um hetta. Samstundis gevur bólkaskipanin undirvísingarstovninum møguleika fyri betri samskipan av sjálvari útbúgvingini, av lærarum, hølum o.ø.

Útbúgvingin verður sambært uppskotinum longd við fýra mánaðum og verður nú 4 ár til longdar. Longdin av starvsliga partinum í verandi útbúgving verður varðveitt. Longda útbúgvingartíðin skal geva rúm fyri, at ástøðiligi parturin verður á bachelorstøði við meira ástøðiligum fordjúpilsi, uttan at hetta tekur nakað av breiddini, og uttan at tað tekur nakað av starvslærutíðini.

Upptøkukrøvini til útbúgvingina verða herd til tess, at tann lesandi fær størri gagn av útbúgvingini.

## 4.3 Endurskoðað pedagogútbúgving

### Endamál

Endamálið við útbúgvingini er at útbúgva pedagogar til pedagogiskt arbeiði við børnum, ungum og vaksnum. Útbúgvingin hevur til endamáls, at tann lesandi vinnur sær neyvan fakligan førleika, sum er í samsvari við samfelagsligu, vísindaligu og námsfrøðiligu menningina í mun til málbólkin. Endamálið er eisini at geva tí lesandi førleika at vinna sær kompetansu á vísindaligum støði, og við atliti at samanhanginum millum ástøði og starvslæru, sjálvstøðugt at skipa og menna pedagogiskt virki, ið er støðið undir framhaldandi hægri lestri – ið verður rokkið við undirvísing, gransking og pedagogiskum menningararbeiði.

### Skipan av lestrinum

Útbúgvingin telur 8 lestrarhálvur (240 ECTS) og tekur støði bæði í eini ástøðiligari og eini starvsligari fatan. Týdningarmikið er at skipa soleiðis fyri, at starvsligi og ástøðiligi parturin verða samskipaðir á bestan hátt, so fakliga og pedagogiska innihaldið í útbúgvingini verður styrkt bæði gjøgnum ástøðiligu frálæruna og samanspælið millum ástøði og starvslæru. Ástøðiligi parturin fatar um 6 lestrarhálvur (180 ECTS), og starvsligi parturin fatar um tvær lestrarhálvur (60 ECTS).

Í høvuðsheitinum verður 4 ára langa útbúgvingin skipað soleiðis:
- Fyrsta lestrarárið er eitt alment dannandi ár við denti á breiddina í pedagogiska økinum. Starvslæran: normaløkið.
- Annað lestrarárið gevur størri innlit í pedagogiska økið, og ymisk pedagogisk serøki verða viðgjørd. Starvslæra: sosialpedagogiska økið/serøkið
- Triðja lestrarárið er eitt fordjúpilsisár uttan starvslæru, har væntað verður, at tann lesandi nemur sær víðkaðan kunnleika, innlit í og fatan av pedagogiska økinum. Starvslæra: eingin starvslæra triðja lestrarár.
- Fjórða lestrarárið er eyðkent av starvslæru – vísindaástøði – og bachelorverkætlanini í hesi raðfylgju. Í fjórða lestrarári verður dentur lagdur á syntesuna í útbúgvingini: at tann lesandi gerst fullkønur og kompetentur. Starvslæra: sjálvvalt øki - evt. samskipað við bachelorverkætlanina.

Í útbúgvingini verður dentur lagdur á, at tann lesandi fær dygga vegleiðing umframt persónligar menningarsamrøður. Greiður málsetningur og endamál við vegleiðing og menningarsamtalum eiga at verða fest á blað og gerast ein samskipaður partur av útbúgvingini, m.a. við eini skjalamappu, ið er knýtt at tí lesandi øll lestrarárini. Samstundis leggur útbúgvingin dent á samskiftis- og leiðsluførleikar og á, at tann lesandi í lestrartíðini tekur lut í ella fær kunnleika um pedagogiskt menningararbeiði. Tann lesandi eigur at fáa grundleggjandi innlit í treytirnar fyri samarbeiði og leiðslu í sambandi við pedagogiskt arbeiði.

## Eftirmeting

Fyri allar bólkar er alment galdandi, at teir skulu sameina teori og praksis í próvtøkuformi teirra, t.e. at próvtøkan, umframt at endurspegla fakligan kunnleika, eisini tekur støði í pedagogiskum praksis.

Vit mæla til, at allir fýra høvuðsbólkarnir hava eina endaliga próvtøku við uttanhýsis próvdómara/um.

Aftan á fyrsta árið verður ein vegleiðandi eftirmeting av hvørjum einstøkum lesandi, og er hon grundarlagið fyri framhaldandi lestri. Vegleiðandi samrøðan er grundað á nøkur greið mál, sum taka støði í kjarnuførleikanum, ið krevst fyri at verða pedagogur. Í fjórðu lestrarhálvu er próvtøka við uttanhýsis próvdómara í samfelagsfakliga bólkinum. Í fimtu lestrarhálvu er próvtøka við uttanhýsis próvdómara í mentanarbólkinum, so sum lýst er í tí partinum. Í sættu lestrarhálvu er próvtøka við uttanhýsis próvdómara í námsfrøði/-sálarfrøði bólkinum og í bólkinum samskifti og leiðsla.

Allar tríggjar starvslærurnar og tær uppgávur, ið verða gjørdar í mun til tær, eru partar av próvtøkunum.

- **Skipan av útbúgvingini í bólkar, blokkar og kubbar**

Í endurskoðaðu pedagogútbúgvingini verður fækkað um lærugreinirnar. Hetta skal skiljast soleiðis, at pedagogútbúgvingin ikki longur verður skipað í lærugreinir, ið møguliga ikki hava samband við hvørja aðra, men í bólkar við samanhangandi blokkum, sum taka støði í, hvat hevur týdning fyri at útbúgva dygdargóðar pedagogar, ið eru bæði ástøðiliga og praktiskt væl grundaðir, samstundis sum teir hava førleikar alla tíðina at eftir- og víðariútbúgva seg.

Bólkaskipanin í pedagogútbúgvingini er býtt í fimm pedagogfakligar bólkar, ið fevna um øll tey øki, sum eiga at vera innihaldið í pedagogútbúgvingini. Við hesi skipan ber til at skipa verkætlanir, skeið og kubbar tvørtur um blokkar og bólkar, sum eru kjarnin í útbúgvingini. Harumframt kemur ein bólkur, sum fevnir um bachelorverkætlanina.

## 4.4 Teir einstøku bólkarnir í pedagogútbúgvingini

Talvan og myndin vísir býtið av teimum 6 bólkunum, sum eru í pedagogútbúgvingini.

| | Bólkur | ECTS |
|---|---|---|
| 1 | Námsfrøði/sálarfrøði | 60 |
| 2 | Samskifti og leiðsla | 15 |
| 3 | Samfelagsbólkurin | 25 |
| 4 | Mentanarbólkurin | 50 |
| 5 | Starvslæran | 60 |
| 6 | Bachelorbólkurin | 30 |
| | **Tilsamans** | **240** |




- Bólkur 1: **Námsfrøði/sálarfrøði bólkurin**

Í hesum bólki eru fleiri blokkar og kubbar (lærugreinir) og ymisk faklig sjónarmið við pedagogikki sum høvuðsblokki (lærugrein). Øki og sjónarhorn úr psykologi, psykiatri, søgu, filosofi, sosiologi og antropologi eru týdningarmiklir partar av bólkinum.

Høvuðsblokkarnir í hesum bólki eru:

- Pedagogikkur sum vísindagrein
- Pedagogisk metoda
- Uppaling, mentan og stovnar
- Sosialisering og persónmenning
- Pedagogisk-psykologisk og kommunikativ ástøði og førleiki
- Menningarsálarfrøði
- Sosialpsykologi
- Sosialar og kommunikativar kompetansur
- Persónligar og relationellar kompetansur
- Pedagogurin í mentanini
- Pedagogisk sosiologi
- Almennur pedagogikkur
- Sosialpedagogikkur
- Spesialpedagogikkur
- Serpedagogikkur

Námsfrøði/sálarfrøði bólkurin er í vavi tvær lestrarhálvur ella 60 ECTS. Í myndini á s. 30 sæst uppskot til eitt møguligt tíðarbýti gjøgnum útbúgvingina. Fyrivarni skal tó takast fyri, at hetta bert eru dømi og ikki endaligt býti.

Í námsfrøði/sálarfrøði bólkinum er málið, at tann lesandi skal verða førur fyri at:

- greina og kritiskt meta um ymisk fyribrigdi, hugtøk, hugsanarhættir, ástøði og hugmyndir um siðmenning, læring, uppaling, umsorgan og menning
- kjakast um og grundgeva fyri ávísari støðu til praktisk, ástøðiligar og siðfrøðiligar spurningar í mun til fakliga grundgivin sjónarmið og vitan
- sjálvstøðugt at loysa fakligar pedagogiskar spurningar
- skilja møguleikarnar í teirri góðu samtaluni og menna um samskiftisførleikan
- menna pedagogiska praksis við grundstøði í eini fatan av og vitan um, hvussu praksis er treytað í relatiónini við onnur menniskju og samstundis er partur av tí samfelagi og teirri mentan, praksis fer fram í
- hava um hendur leiðslu og samarbeiði á pedagogiskum stovnum og aðrastaðni, sum pedagogiskt virki er partur av
- fata, hvussu stovnur og pedagogiskur praksis eru partar av bæði tjóð og alheiminum

Pedagogikkur og pedagogisk hugsan eru grundarlagið fyri pedagogútbúgvingini og eiga bólkar, blokkar, kubbar og lærugreinir at síggjast í mun til pedagogisk ástøði, fatanir og praksis.

Eftirmeting fyri bólkin verður sum fyriskrivað í brotinum 4.3.

## Bólkur 2: **Samskifti og leiðsla**

Tørvurin á professionellari vitan um samskifti og samskiftisástøði gerst alt meira átrokandi í pedagogyrkinum. Pedagogurin møtir í sínum arbeiði nógvum ymiskum fakbólkum, brúkarabólkum og avvarðandi. Harumframt eru samstarvshættirnir alt meira eyðkendir av toymum og verkætlanarbólkum, ið krevja samskiftisførleika. KT- førleikin er týdningarmikil liður í samskiftisførleikanum. Innlit í, vitan um og førleiki at handfara leiðslu á einum dygdargóðum støði, eru førleikar, ið eru alneyðugir í nútímans arbeiðslívi. Nógvir pedagogar møta í arbeiðslívi sínum kravinum um leiðsluførleika

yvirskipað ella í gerandisdegnum á ymiskum stovnum. Føroyskt mál í øllum sínum fjølbroytni sum samskiftismiðil eigur at vera partur av hesum bólki.

Bólkurin samskifti og leiðsla kann fevna um:

- Sosialar og kommunikativar kompetansur
- Kollegialt samskifti og samstarv
- Skilja møguleikarnar í teirri góðu samtaluni og menna um samskiftisførleikan.
- Føroyskt mál sum samskiftismiðil
- At loysa ósemjur
- Supervisión
- Tvørfakligt samskifti og samstarv
- Leiðslu á stovnum og í kommunum
- Leiðsluástøði og metodur
- At skipa fyri og leiða fundir, prosjektleiðsla o.a.
- Leiðslu og samstarv
- Førleikan at seta leiðsluástøði í samband við ítøkiligan pedagogiskan praksis
- Pedagogiska leiðslu
- Stovnar og stovnskipanir
- Stovnsleiðslu og virðisskipanarleiðslu
- Mennning av pedagogiskum virðisgrundarlagi og menningar-ætlanum og handliplanum
- KT-samskifti og pedagogiska leiðsla

Arbeiðshættirnir í samskifti og leiðslu er skifti millum ástøðiliga fatan og royndir um verkætlanararbeiði, menningararbeiði fyrilestrar og praksisvitjan at nema sær kunnleika til allan bólkin.

Bólkurin 'samskifti og leiðsla' telur 15 ECTS. Eftirmeting fyri bólkin verður sum fyriskrivað í brotinum 4.3.

## Bólkur 3: **Samfelagsbólkurin**

Hesin bólkur skipar seg t.d. í hesi fakligu øki:

- sosiologi (tann einstaki og umheimurin)
- antropologi (mentanarhugtakið og mentanarfatanin)
- politologi (staturin, myndugleikar, valdsfatan, avgerðargongdir, umsiting og ráð)

Omanfyri nevndu øki eru við sum samfelagsfaklig sjónarhorn í ymiskum bólkum og blokkum í útbúgvingini og skulu vera medvirkandi til at fáa lesandi at skilja undir hvørjum umstøðum og treytum, pedagogiskt virksemi fer fram.

Í samfelagsbólkinum skal tann lesandi nema sær praktiskar og teoretiskar fatanir av fortreytunum og grundarlagnum fyri sosiologiska, antropologiska og politologiska økinum og neyvan kunnleika til samfelagsvísindaligar háttaløg við m.ø. tí endamáli at kunna fyrihalda seg kritiskt til gransking og granskingarúrslit.

Samfelagsbólkurin er settur saman av ymsum blokkum, kubbum og sjónarmiðum, ið verða vald út í mun til pedagogisk ástøði, praksis og fakligheit. Dentur má tó leggjast á sosiologiina sum ein týdningarmiklan sambindingarlið til pedagogiska bólkin – sum ein fatanarkarmur um samanhangin, sum pedagogiskt virki er ein partur av, letur seg ávirka av og ávirkar.

Samfelagsbólkurin er eina lítla lestrarhálvu í vavi, t.e. 25 ECTS. Á mynd síðu 31 sæst uppskot um møguligt tíðarbýti í teimum ymsu lestrarhálvunum. Fyrivarni skal tó takast fyri, at hetta bert eru dømi og ikki endaligt býti.

Eftirmeting fyri bólkin verður sum fyriskrivað í brotinum 4.3.

### Bólkur 4: **Mentanarbólkurin**

Mentanarbólkurin fevnir um flestu partar av tí virksemi, ið myndar mentanina. Bólkurin fevnir um: náttúru og heilsu, móðurmál, miðlar og musiskt kreativar lærugreinir. Bólkurin er býttur í ein felagspart á 20 ECTS og ein valfrían part á 30 ECTS.

Eitt vegleiðandi býti av mentanarblokkinum í blokkar og kubbar kann verða hetta:

| Blokkar | Kubbar |
|---|---|
| Náttúra og heilsa | Heilsa, kroppur og vistfrøði<br>Náttúra<br>Ítróttur og rørsla |
| Móðurmál, mentan og miðlar | Móðurmál<br>Miðlar<br>Mentanarligt samskifti<br>Mentan og estetikkur |
| Musiskar og kreativar lærugreinir | Verkstaðarlærugreinir<br>Tónleikur<br>Drama |

Týdningarmikil partur av kompetansuni hjá pedagoginum er førleikin at fata og hava innlit í metanina og mentanarlig virði, umframt at pedagogurin er víðskygdur í mun til nógvar ymiskar mentanarligar málbúnar. Tað er umráðandi, at pedagogurin er medvitin um leiklutin hjá sær at bera mentan víðari á ein ábyrgdarfullan hátt og samstundis vera mentanarskapandi.

Blokkarnir verða samskipaðir sum tvørfakligar verkætlanir, ið geva innlit í og fatan av mentanarligum amboðum, samanhangum og estetiskum málbúnum.

Mentanarbólkurin er 50 ECTS í vavi. Í talvuni í brotinum 4.5 sæst uppskot um møguligt ECTS-býti í teimum ymsu lestrarhálvunum.

Fyri allar partarnar av mentanarbólkinum er galdandi, at arbeitt verður við blokkunum við støði í eini pedagogiskari fatan, har endamálið er at menna mentanarligu førleikarnar hjá pedagoginum, so at hann við støði í eini pedagogiskari fatan av hesum útbúgvingarparti dugir at seta pedagogisk tiltøk í verk í mun til mentanarliga bólkin. Tann lesandi skal t.d. ikki bert hava tónleik fyri sjálvur at læra at spæla upp á eitt ljóðføri, men eisini fáa førleika, kunnleika, vitan og innlit viðvíkjandi tónleikanýtslu í pedagogiskum virksemi, tað veri seg í mun til børn ella aðrar partar av arbeiðsøkinum hjá pedagoginum. Sjónarhornið er alla tíðina pedagogiskt.

### *Náttúran og heilsa*

Endamálið við hesum blokki er, at teir lesandi ogna sær eina breiða fatan av vælveru menniskjans og samhanginum millum kropsligu og sálarligu støðuna hjá tí einstaka í mun til lívsstílin, og at teir lesandi gerast førir fyri at seta pedagogisk tiltøk í verk, sum kunnu skapa javnvág, vera heilsufremjandi og gagna vælveruni hjá tí einstaka. Í tilgongdini til náttúruna skulu teir lesandi gerast varugir við, at í náttúruni eru møguleikar fyri eini sansiligari og kognitivari heildarfatan.

Endamálið kann vera, at tey lesandi

- ogna sær kunnleika um, hvussu kroppur, matur, reinføri og lívsstílur eru í samljóði
- læra at seta fyribyrgjandi og mennandi tiltøk í verk
- fáa kunnleika um føroyska náttúru og gerast førir fyri at nýta náttúruna sum eitt pedagogiskt amboð í kognitivu, kensluligu og kropsligu menningini hjá málbólkinum
- ogna sær kunnleika um fjølbroyttar náttúruupplivingar, og hvussu hesin kunnleiki kann nýtast til at stimbra forvitnið og margfeldið
- nema sær eina fatan av náttúruni sum eina vistfrøðiliga skipan, ið er grundarlagið undir allari tilveruni
- við støði í pedagogiskari fatan ogna sær kunnleika, innlit og fatan av samanhanginum millum pedagogiskt virksemi, náttúruna og heilsuna.

### *Móðurmál, mentan og miðlar*

Endamálið við hesum blokki er, at teir lesandi ogna sær vitan um føroyskt mál og føroyska mentan í sínum margfaldni. Uppi í hesum hoyrir bæði tað at kunna seg um føroyskan siðaarv, móðurmál og mentan í sínum dagliga búna og sum parti av heims-samfelagnum. Dentur eigur at verða lagdur á, at tann lesandi fær mennandi avbjóðingar í føroyskum máli og føroyskari mentan, og at hann gerst varur við møguleikarnar at brúka allar føroyskar málbúnar at gerast virkin mentanarbrúkari og skapari. At tann lesandi gerst kunnugur við nógvar ymiskar samskiftishættir og týdning teirra. Móðurmálið og miðlar eru samstundis týdningarmikil samskiftisamboð í nútíðarheiminum; bæði sum samskiftisamboð og sum framberi. Týdningarmikið er, at teir lesandi ogna sær kunnleika um miðlarnar, bæði sum miðlabrúkarar og -skaparar og ta ávirkan, teir hava.

Móðurmál, føroysk mentan og miðlar eru týdningarmiklir partar av samleikagerðini og samskiftinum. Dentur eigur at verða lagdur á, hvussu vit menna eitt umhvørvi, sum er grundað á hesa vitan, ið er hugfangandi, skapandi og gevur pláss fyri margfeldinum, at pláss bæði er fyri tí einstaka, samstundis sum dentur verður lagdur á felagsskapin sum karm um føroyska mentan. Í blokkinum "Móðurmál, mentan og miðlar" eigur at verða nomið við mentan og estetikk í einum pedagogiskum samanhangi. Dentur eigur at leggjast á, hvussu estetisk fatan verður ment og sæst aftur í mentanini. Somuleiðis eigur dentur at verða lagdur á, hvussu børn menna málsligan førleika og fjølbroytni úr einum pedagogiskum sjónarhorni.

### *Musiskar og kreativar lærugreinir*

Endamálið við hesum blokki er, at teir lesandi ogna sær vitan og royndir við estetiskum og skapandi lærugongdum. At estetiskar og sansiligar upplivingar gerast grundarlagið fyri

ástøðiligari refleksión og framburðarkompetansu. Uppi í hesum er, hvussu tær estetisku fatanirnar og málbúnarnir verða frambornir. Hetta verður gjørt við støði í egnum royndum ástøðiligari fatan og hvussu hesar síggjast aftur í pedagogiskum yrki.

Í hesum bólki verður dentur lagdur á, at tann lesandi nemur sær fortreytirnar fyri pedagogiskari handling við støði í musiskum-estetiskum málbúnum. Skipast skal fyri, at tann lesandi:

- fær kunnleika til musisku og estetisku verðina og tilhoyrandi fakligu viðurskiftini,
- fatar og fær innlit í mentanarliga fatan, málbúnar og umstøður,
- fatar, fær innlit í og sannkennir týdningin, ið estetikkurin hevur fyri musiskt og kreativt virksemi.

Hetta eru virkisgreinir, ið eru týdningarmiklir partar av førleikanum hjá pedagoginum at verða førur fyri at seta pedagogiskar gongdir í verk. Tí má alt virki á hesum øki taka støði í eini pedagogiskari fatan um, hvønn leiklut virkislærugreinirnar hava í pedagogiskum virki bæði ástøðiliga og praktiskt.

Mentanarbólkurin endar við eini próvtøku, sí brot 4.3. Próvtøkan verður skipað innan einstøku blokkarnar. Lærustovnurin hevur ábyrgd av, at allir blokkarnir verða umboðaðir til próvtøkuna í felagspartinum, t.e. at stovnurin avger í hvørjum blokki tann lesandi skal til próvtøku í. Próvtøkan í felagspartinum kann skipast sum ein innanhýsis eftirmeting.

## Bólkur 5: **Starvslæran**

Starvslærubólkurin er ein útbúgvingarstarvslæra, har dentur verður lagdur á læringina hjá tí lesandi. Starvslæran er eksemplarisk, fatað á tann hátt, at serstakar royndir innan avmarkað øki verða brúktar at fata almenn pedagogisk prinsipp fyri alt pedagogiska økið. Við samspæli og samstarvi millum ástøðiliga og starvslæru partin av útbúgvingini verður roynt at knýta saman ástøðið og starvslæruna.

### *Starvslæran fyrsta lestrárárið*

Í starvslæruni fyrsta lestarárið verður nomið við almenn pedagogisk mál í mun til børn og ung. Í hesum útbúgvingarparti verður nomið við breiddina í útbúgvingini og tey øki, hon fevnir um fakliga, ástøðiliga og í praksis. Dentur verður lagdur á tey ymsu økini í pedagogiskum arbeiði og innlit í pedagogiskt arbeiði, m.a. skipan av arbeiðinum, umstøður at arbeiða undir og rutinur. Bæði starvslæran og starvslæruuppgávan skulu vísa, at tann lesandi fatar og dugir at lýsa breiddina í útbúgvingini. Breiddin verður brúkt at skapa útsýni, ið samstundis er medvirkandi til, at tann lesandi fær yvirlit yvir pedagogiska økið og útbúgvingina.

### *Starvslæran annað lestrárárið*

Í starvslæruni annað lestraárið verður dentur lagdur á tey sosialpedagogisku økini, samstundis sum denturin í sjálvari starvslæruni verður lagdur á at fara í dýpdina við teimum kunnleikum, arbeitt hevur verið við fyrsta og annað lestrárárið. Meðan denturin fyrsta árið varð lagdur á breiddina, verður annað árið arbeitt við at duga at avmarka seg

og at fara í dýpdina. Á henda hátt eigur tann lesandi at fáa betri innlit í pedagogiska økið og útbúgvingina.

Í aðru starvslæruni eigur tann lesandi at læra seg at fata týdningin av mentanarligum og sosialum viðurskiftum, ið hava týdning fyri pedagogiska arbeiðið og pedagogisku viðurskiftini annars. Hetta verður gjørt við at eygleiða relatiónir millum brúkara og pedagog. Eisini eigur tann lesandi á einum praktiskum og ástøðiligum grundarlagi at læra seg at reflektera yvir relatiónirnar millum brúkara og yrkisfólk á tí pedagogiska økinum. Tann lesandi eigur at fáa eina fatan av pedagoginum sum amboð í pedagogiskum arbeiði, og skal her eisini duga at vísa vitan og kunnleika á pedagogiska økinum.

Arbeitt verður við at økja um kunnleikan til pedagogiska økið og arbeiðið. Við at avmarka seg og við at fara í dýpdina verður økt um innlitið og fatanina av pedagogiskum praksis og ástøði.

### *Starvslæran fjórða lestrarárið*

Í starvslæruni fjórða lestrarárið, sum er sjálvvalt í mun til økið, verður dentur lagdur á at duga at reflektera yvir tað, sum lært er hini trý lestrarárini. Tann lesandi hevur nú førleika (kompetansu) til sjálvur at planleggja, fata og fara inn í pedagogiskar tilgongdir við støði í støðugum refleksivum umhugsni; samstundis sum tann lesandi refleksivt eigur at duga at fata og fara inn í starvslærustaðið á ein hátt, sum vísir, at hann dugir at brúka ta nú ognaðu vitanina til uppskot um pedagogiskar virkisætlanir, betran og broytingar.

Starvslæran fjórða lestrarárið er beint undan bachelorverkætlanina og kann verða í mun til tað verkevnið, sum verður viðgjørt í bachelorverkætlanini.

Málið við starvslæruni er, at tann lesandi fær førleika til sjálvur at seta í gongd, fyriskipa, gjøgnumføra og eftirmeta pedagogiskar arbeiðsgongdir. Hetta verður í starvslæruni gjørt í samstarvi við brúkarar og medarbeiðarar á starvslærustaðnum. Endamálið er, at tann lesandi fær førleika til at savna inn, arbeiða við og analysera praktiskt og ástøðiligt tilfar – við tí fyri eyga at læra seg gjølla at hugsa um hvørja ávirkan, miðvíst pedagogiskt arbeiði hevur; hetta fyri at læra seg, hvussu pedagogiskar broytingar síggjast aftur: bæði beinleiðis her og nú, sett inn í eina størri samfelagsliga fatan og í mun til ein sjálvan og málbólkin.

Í starvslæruni skal tann lesandi samanumtikið:

- menna førleikan sjálvstøðugt og við ábyrgd fara inn í pedagogiskt arbeiði og samarbeiði,
- nema sær hegni at lýsa, greina og perspektivera praksis,
- taka ábyrgd av egnari læru og menning í starvslæruni,
- handla og skipa fyri í mun til refleksiónir yvir praksis og ástøði.

Starvslæran er skipað við trimum blokkum í mun til kjarnuøkið í útbúgvingini:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Starvslæra 1 | Innlit | Vísa | Breidd/vídd |
| Starvslæra 2 | Kunnleiki | Duga | Dýpd |
| Starvslæra 3 | Førleiki/-kompetansa | Brúka/-handla | Refleksión |

Starvslærubólkurin er 2 lestrarhálvur í vavi, t.e. 60 ECTS, og er sundurbýttur í tríggjar starvslærublokkar, sum tilsamans fevna um 40 vikur (13+13+14 vikur = 40 vikur). Semja er millum partarnar, ið varða av verandi starvslæru (lesandi, Læraraskúlin og stovnar), at longdin á starvslæruni í verandi pedagogútbúgving skal varðveitast. Samstundis er tað umráðandi at varðveita starvslæruna sum eina *útbúgvingar*starvslæru.

Starvslæran er ein ógvuliga týdningarmikil útbúgvingarpartur, har ástøðiligi og praktiski partarnir av útbúgvingini verða tvinnaðir saman í eina heildarfatan av pedagogyrkinum. Hetta setur stór krøv til útbúgvingarstað og starvslærupláss, at hesi duga at draga felags línu, seta greið mál fyri starvslæruna og duga at fara inn í eitt samstarv við hvønn annan. Til tess at tryggja sær dygdina av starvslæru og útbúgving er neyðugt at seta størri krøv til starvslærulærararnar og stovnarnar, ið taka ímóti lesandi, og tí verður mælt til, at farið verður undir skipaða útbúgving av starvslærarum, og at henda útbúgving verður partur av lógarverkinum um endurskoðaðu útbúgvingina. Somu krøv eiga at verða sett útbúgvingarstaðnum, at miðvíst verður arbeitt við at samansjóða skúla og starvslærupláss.

Allar tríggjar starvslærurnar enda við skrivligari uppgávu, ið er partur av endaligu próvdømingini í starvslæru. Ein heildarmeting verður gjørd við støði í ástøði og praksis.

## Bólkur 6: **Bachelorbólkurin**

Bachelorbólkurin er ein lestrarhálva í vavi, t.e. 30 ECTS, og svarar hetta til samsvarandi útbúgvingar á sama støði í grannalondunum. Bachelorbólkurin er býttur í tríggjar blokkar: 5 ECTS eru í blokkinum 'háttarlagslæra', 5 ECTS í blokkinum 'vísindaástøði' og 20 ECTS í blokkinum 'bachelorverkætlan'.

Bachelorverkætlanin fjórða lestrarárið er í framhaldi av starvslæru og vísindaástøði. Verkætlanin kann vera ein:

- empirisk og kvalitativ og kvantitativ kanning av einum pedagogiskum spurningi við støði í starvslæruni ella
- partur av menningarætlan á einum stovni ella á einum pedagogiskum øki ella
- uppgáva, ið ikki hevur beinleiðis tilknýti til starvslæruna.

Bachelorverkætlanin verður dømd við uttanhýsis próvdómara, sí brot 3.4.

## 4.5 Dømi um bólkabýti á árshálvur

Í talvuni niðanfyri sæst uppskot til eitt møguligt bólkabýti á árshálvur í allari útbúgvingini. Hetta er bert at fata sum dømi um, hvussu pedagogútbúgvingin kann verða skipað. Vavið av bólkunum er ásett við ECTS-stigum, men samansetingin og vavið av blokkum og kubbum í einum ávísum bólki er ikki endaliga ásett (sí lýsing av bólkum, blokkum og kubbum í broti 3.1).

| | 1. hálva | 2. hálva | 3. hálva | 4. hálva | 5. hálva | 6. hálva | 7. hálva | 8. hálva | ECTS tils. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Námsfrøði/sálarfrøði | 10 | 5 | 5 | 5 | 10 | 15 | 5 | 5 | 60 |
| Samskifti og leiðsla | 5 | | 5 | | | 5 | | | 15 |
| Samfelagsbólkur | 5 | | 5 | 5 | 5 | 5 | | | 25 |
| Mentanarbólkur | 5 | 5 | 10 | | 15 | 5 | 5 | 5 | 50 |
| Starvslæran | | 20 | | 20 | | | 20 | | 60 |
| Bachelorbólkur | 5 | | 5 | | | | | 20 | 30 |
| | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 | 240 |



# 5 Lærarautbúgvingin

## 5.1 Inngangur

Lærarautbúgvingin eigur at geva lesandi á Føroya Læraraskúla førleikar, so at teir kunnu lúka krøvini, ið ásett eru í fólkaskúlalógini, tá talan er um persónlig, samfelagslig og sosial viðurskifti og ikki minst faklig, didaktisk og námsfrøðilig. Lærarin skal vera førur fyri at møta næmingunum á tí støði, teir eru á, og skal duga at laga undirvísingina til einstaka næmingin. Útbúgvingin skal geva teimum lesandi venjing í at leggja til rættis, samstarva, gjøgnumføra og eftirmeta undirvísing. Harumframt skulu teir lesandi ogna sær førleika at granska, kveikja og seta í verk menningartiltøk.

Ofta hevur verið víst á, at vit hava havt eina eindarlærarautbúgving á Føroya Læraraskúla; men í veruleikanum verða lærarar, ið verða útbúnir á læraraskúlanum, hvørki fakella eindarlærarar, Og kjakið heldur fram, um vit skulu útbúgva "breiðar" eindarlærarar ella "smalri" faklærarar, m.a. tí at vit hava nógvar smáar skúlar við fáum lærarum. ið skulu kunna undirvísa í fleiri lærugreinum.

Tíðir broytast, og nýggj og onnur krøv verða sett, eisini í sambandi við útbúgving og útbúgvingarmøguleikar. Samstundis sum eitt rák er at útbúgva fólk við serkunnleika, t.d. serlærarar ella faklærarar, er eisini ein tendensur at gera útbúgvingar so fjøltáttaðar, at hin einstaki hevur lætt við at laga seg til broyttar umstøður á arbeiðsmarknaðinum, m.a. við eftirútbúgving. Ella sagt øðrvísi: Hesar fjøltáttaðu útbúgvingarnar eru gott grundarlag fyri eini "lívslangari læring". Góð dømi um hesa gongd eru fjøltáttaðar 1-2 ára støðisútbúgvingar á Aalborg og Roskilde Universitetunum, sum við 1-2 ára lærugreinalestri aftaná geva bachelor-heitið. Men eisini mangar av teimum kandidat- og masterútbúgvingum, sum universitet í Norðurlondum hava boðið út hesi seinnu árini, eru ógvuliga fjøltáttaðar. Í staðin fyri útbúgvingar í teim siðbundu lærugreinunum er tað vorðið vanligari at bjóða útbúgvingartilboð við eini fjøltáttaðari, tematiskari tilgongd.

Í mongum av grannatjóðum okkara, og eisini her hjá okkum, herðast politisku krøvini um fakligar førleikar í fólkaskúlanum. Sokallaðu PISA-kanningarnar vísa ójavnar í t.d. lesi-

og skriviførleikum hjá næmingum í teim ymisku londunum, og tey londini, sum ikki klára seg so væl, herða krøvini til m.a. móðurmálsundirvísingina og lesi-/skriviundirvísingina. Fyri at tryggja at møgulig tiltøk við herdum krøvum virka, og at tey í veruleikanum eru ein bati, verða samstundis fleiri royndir/próvtøkur settar í verk. Hesi krøv um fakligar førleikar og royndir í fólkaskúlanum og til undirvísingarstovnar yvirhøvur ávirka sjálvsagt eisini krøv og væntanir til læraraútbúgvingina.

Bologna-yvirlýsingin (sí brot 1.2) hevur samstundis sett ferð á eina tilgongd, har útbúgvingar ella útbúgvingarpartar skulu gerast sambæriligir í øllum londum í Europa. Í prinsippinum merkir hetta, at tú – sum lesandi – kanst seta tína útbúgving saman av útbúgvingarpørtum, skeiðum o.t., sum eru tikin í ymiskum londum og á ymiskum stovnum. Hetta hevur við sær, at útbúgvingarnar meira gerast persónligar og smidligar.

Henda gongd hevur nógvar fyrimunir við sær, men krevur samstundis, at vit klárt definera teir kjarnuførleikar, sum hoyra til læraraútbúgvingina og teir einstøku bólkarnar ella lærugreinirnar, tí tá ið útbúgvingin gerst persónlig og liðilig og altíð kann/skal lagast til títtar samfelagsbroytingar, kann hon skjótt missa sín profil og fakliga samleika. Rákið móti størri serkunnleika ella breidd, individualiteti og smidleika krevur, at vit finna ein fakligan kjarna, sum vísir, hvør henda útbúgvingin er og hvørjum, hon stendur fyri. Hetta merkir, at vit noyðast at definera ein kravdan part, sum er felags fyri allar læraralesandi, og ein valfrían part, har hin einstaki lesandi sjálvur kann velja frítt. Gerst hin kravdi felagsparturin stórur, er vandi fyri, at læraraútbúgvingin verður skírd "eindarlærara-útbúgving", og at hon verður skírd "ser-" ella "faklærara-útbúgving", um hin valfríi parturin gerst stórur. Hesi heiti á mannamunni hava tó minni týdning. Tað týdningarmesta er at finna eina javnvág, har teir lærarar, ið útbúnir verða, hava góðar fakligar, didaktiskar, námsfrøðiligar, sosialar og persónligar førleikar/kompetansur.

Í hesum áliti eru valini viðvíkjandi innihaldi, skipan o.ø. gjørd til tess at finna eina góða javnvág millum øll krøv og ynski, sum eru til læraraútbúgvingina. Hesi val taka atlit at so mongum viðurskiftum sum gjørligt, og verða umrødd í næsta broti.

## 5.2 Høvuðslutir í broytingini

Nýggja læraraútbúgvingin hevur somu longd sum higartil, t.v.s. 4 ár. Verandi lærara-útbúgving er ikki granskingargrundað, men nýggja útbúgvingin verður skipað sum ein granskingargrundað bachelorútbúgving á akademiskum stigi.

Meðan flestu lærugreinirnar í verandi læraraútbúgving eru skipaðar í vanliga tímatalvu við ávísum tímatali um vikuna alt skúlaárið, verður komandi útbúgving skipað eftir eini "bólkaskipan", t.e. í bólkar, blokkar og kubbar í styttri ella longri samanhangandi tíðareindir, har undirvísingin er savnað meira saman (konsentrerað). Fyri t.d. linju-greinirnar, sum verða lisnar í eitt skúlaár, kemur hetta at merkja, at tann lesandi hevur helvtina av síni tíð til ta einu lærugreinina í eitt heilt ár, og tá ið hann samstundis ikki lesur so nógvar aðrar lærugreinir, gevur henda skipan góðar møguleikar at savna seg um

og hugdýpa seg í t.d. tí eini linjugreinini. Aftur at verandi linjugreinum koma tvær nýggjar: “KT” og “Náttúra & tøkni”.

Í læraraútbúgvingini verða tveir nýggir bólkar:

- ”At gerast lærari” (20 ECTS), sum verður lisin 1. lestrarárið, og
- Bachelorbólkurin (30 ECTS), sum í høvuðsheitum verður lisin seinastu lestrarhálvuna. Hesin bólkur fevnir m.a. um bachelorverkætlanina, ið er 20 ECTS í vavi.

Hetta merkir, at útbúgvingin byrjar við eini tematiskari tilgongd um at gerast lærari og endar við, at drigið verður samanum, og træðrirnar verða savnaðir við bachelor-uppgávuni.

Føroyskt, starvslæra, námsfrøði og sálarfrøði verða framhaldandi felagslærugreinir í nýggju útbúgvingini. Hinar felagslærugreinirnar í verandi skipan, t.e. støddfrøði, danskt, ítróttur, samtíðarkunning, kristni, skriving, handaverk og list, detta burtur sum felagslærugreinir. Hesar seinnu kunnu tó, við undantaki av skriving, veljast sum linjugreinir. Talið av felagslærugreinum lækkar, men nú vera fýra linjugreinir.

Lærugreinirnar, ið kunnu veljast sum linjugreinir, eru bólkaðar í fýra tættir: A: *Kravdur táttur* (støddfrøði, kristni, ítróttur), B: *Náttúruvísindaligi tátturin* (alis-/evnafrøði, lívfrøði, geografi, náttúra og tøkni, KT, heimkunnleiki), C: *Hugvísindaligi/samfelagsligi tátturin* (føroyskt, danskt, enskt, týskt, søga, samfelagsfrøði) og D: *Musiski/kreativi tátturin* (myndlist/evning, handarbeiði, smíð, tónleik).

Lesandi skulu velja minst eina av lærugreinunum í tátti A, sum ofta verða roknaðar sum lærugreinir hjá flokslærara í fólkaskúlanum. Verður bert ein linjugrein vald úr tátti A, skal tann lesandi velja minst eina lærugrein úr einum tátti, har valda linjugreinin úr tátti A ikki hoyrir til. Velur tann lesandi fleiri enn ta einu lærugreinina úr tátti A, fellur síðst nevnda kravið burtur.

Við hesi skipan verður tryggjað eitt ávíst fjølbroytni í linjugreinavalinum hjá teimum lesandi, samstundis sum tey eisini hava møguleika at fordjúpa seg á færri økjum enn verandi útbúgving loyvir. Velur tann lesandi allar tríggjar lærugreinirnar í tátti A, vil hann verða rættiliga væl brynjaður sum ’eindarlærari’, eisini tá ið havt verður í huga, at lærugreinin føroyskt er felagsgrein í læraraútbúgvingini.

## 5.3 Bólkabýtið

Í bólkabýtinum eru endurspeglað tey val, sum hava týdning fyri komandi lærara-útbúgving. Umframt tær vanligu linjugreinirnar, sum svara til lærugreinirnar í fólkaskúlanum, eru kunningartøkni og ’náttúra og tøkni’ komnar afturat, sí brot 5.4 (Bólkur 4: Linjugreinir). Lærugreinatalið í felagspartinum er lækkað, og bólkurin “At gerast lærari” og bachelorbólkurin eru komnir afturat.

Yvirskipað verður sjálv útbúgvingin sett saman av 6 bólkum við hesum lestrarvavi

| | Bólkur | ECTS |
|---|---|---|
| 1 | "At gerast lærari" | 20 |
| 2 | Námsfrøði/sálarfrøði | 25 |
| 3 | Føroyskt | 20 |
| 4 | Linjugreinir<br>linjugrein a 30<br>linjugrein b 30<br>linjugrein c 30<br>linjugrein d 30 | 120 |
| 5 | Starvslæran | 25 |
| 6 | Bachelorbólkurin<br>verkætlan 20<br>vísindaástøði og háttalagslæra 10 | 30 |
| | Tilsamans | 240 |




## Kravdir og valfríir útbúgvingarpartar

Bólkarnir skulu allir lesast, men kunnu grundleggjandi býtast í tveir útbúgvingarpartar við ymiskum skipanarligum eyðkennum: einum *felagsparti*, sum í høvuðsheitum er kravdur, har lesandi ikki hava møguleika at velja frítt, og einum *valfríum parti*, har lesandi hava fleiri valmøguleikar, tó við onkrum bindingum. Í felagspartinum er talan um bólkarnar 1, 2, 3, 5 og 6, meðan valfríi parturin er bólkur 4, t.e. linjugreinirnar.

Í felagspartinum lesa øll somu bólkar, blokkar og kubbar. Tó er eitt ávíst valfrælsi í sambandi við starvslæruna og bacheloruppgávuna, at velja evni, spurdómar o.s.fr., og sjálvsagt kunnu lesandi eisini hava ávirkan á innihaldsliga partin í ymsu pørtunum av felagslærugreinunum. Skipanarliga eru tó eingir valmøguleikar í hesum parti.

Felagsparturin fevnir um 50% av lestrarvavinum og skal tryggja, at øll lærarlesandi fáa eitt felags kjølfesti, sum hevur týdning í tí at vera lærari. Hesin útbúgvingarpartur allýsir teir kjarnuførleikar, ella tann fakliga kjarnan, sum allir lærarar eiga at hava. At áseta henda part hevur serligan týdning í eini tíð, tá ið útbúgvingar og samfeløg støðugt broytast. Men ásetingin er altíð í eini andsagnarstøðu: tað er umráðandi at halda fast í tað, sum veruliga er grundleggjandi, samstundis sum hesin útbúgvingarpartur ikki má verða so stirvin, at tíðin fer frá honum. Tí skulu námsskipanirnar endurskoðast regluliga.

Valfríi útbúgvingarparturin við bólki 4 fevnir um fýra linjugreinir, sum hvør er 30 ECTS. Til ber at velja ímillum allar lærugreinir, sum eru í fólkaskúlanum, og harumframt eisini kunningartøkni og 'náttúra og tøkni'. Tó eru nakrar bindingar í valinum av linjugreinum (sí brot 5.2). Samanlagt er valfríi parturin 50% av lestrarvavinum. Hann skal geva teim lesandi møguleika at hugdýpa seg á ávísum økjum. Linjugreinirnar verða framhaldandi ein berandi liður í læraraútbúgvingini, sum saman við didaktikkini, námsfrøðini/-sálarfrøðini og starvslæruni 'mynda' útbúgvingina. Linjugreinirnar skulu tryggja fakfakliga

førleikan og fakdidaktikkina, so tann lesandi er fyrireikaður at samantvinna fak og undirvísing.

## 5.4 Teir einstøku bólkarnir í læraraútbúgvingini

### Bólkur 1: **"At gerast lærari"**

Hesin bólkur er kravdur og fevnir um 20 ECTS. Ætlanin við bólkinum er, at tann lesandi beinanvegin fær møguleika at seta seg sjálvan í støðuna sum lærari. Lærarastarvið er ikki bert at "proppa vitan í" næmingar. Tí er neyðugt hjá tí lesandi, umframt at ogna sær fakliga vitan, eisini at búnast persónliga, á øllum økjum rúmkast, og soleiðis gerast búgvin at taka á seg lærarastarvið.

Royndir hjá tí lesandi frá starvslæruni og royndir annars eiga at vera partur av grundarlagnum fyri ástøðiliga partinum í hesum bólki. Á tann hátt kann bólkurin gerast viðkomandi og vera við til at skapa eina heildarfatan og eind í útbúgvingini.

Innihaldið í hesum bólki kemur at fevna um:
- Grundleggjandi førleikar
- Samstarv og samskifti
- Læring
- Flokslæraraarbeiði
- KT-førleikar

Í útbúgvingini eigur tann lesandi at fáa kunning um tær reglur og fyriskipanir, ið lærarar koma at arbeiða undir í fólkaskúlanum. Tey lesandi eiga at venja vanligar lestrarførleikar, informatiónsleiting, retorikk o.a.

Fólkaskúlalógin setir m.a. treytir um samstarv. Lærarin hevur í sínum samskifti samband við næmingar, lærarar, foreldur, myndugleikar o.o., og hetta krevur góð evni at laga seg til ymiskar umstøður. Tí er neyðugt, at lærarar eru førir fyri at samstarva við leiðslu, aðrar lærarar, heimini o.o., og at teir duga at føra seg fram á ymiskum pallum. Hetta setir stór krøv til eitt nú samstarvsevnini hjá lærarum, og neyðugt er eisini, at teir venja røddina, ið er eitt hitt týdningarmesta amboðið hjá teimum.

Í fólkaskúlanum er arbeiðið skipað í toymum. Hetta eigur at síggjast aftur í lærara-útbúgvingini. Tann lesandi eigur sostatt, umframt at ogna sær fakliga vitan, at læra at samstarva um uppgávur og leggja til rættis undirvísingartilgongdir. Í hesum sambandi hevur hugtakið læring ein stóran og avgerandi týdning.

Ábyrgd, arbeiðsøki og uppgávur hjá flokslærarum eru ógvuliga fjøltáttaðar. Flokslærarin er formaður í toyminum um flokkin. Hann er leiðarin, ið skal samskipa alt virksemið um flokkin soleiðis, at kravd undirvísingarevni verða tikin fram, at trupulleikar verða loystir, og at trivnaðurin sum heild er í lagi. Flokslærarin er sambindingarliður millum heim og skúla og við leiðsluna, og tí er henda uppgávan ógvuliga týdningarmikil – ein

snúningsdepil í skúlanum. Flestu lærarar verða flokslærarar, so hetta økið eiga lærara-lesandi at fáa holla kunning um og at venja í sambandi við starvslæruna.

KT eigur frá byrjan av at gerast ein natúrligur og grundleggjandi partur í tí at gerast lærari. Ikki sum ein sjálvstøðug lærugrein, men heldur sum ein integreraður partur av øllum virki og hugsanarhátti lærarans.

### Bólkur 2: **Námsfrøði/sálarfrøði**

Námsfrøði/sálarfrøði er framhaldandi ein felagslærugrein og er 25 ECTS í vavi. Hetta er nakað minni enn í verandi útbúgving, men bólkurin "at gerast lærari" hevur í stóran mun eisini námsfrøðiligar/sálarfrøðiligar tilgongdir, so samanumtikið verður námsfrøði/-sálarfrøði í vavi á leið so umfatandi sum higartil.

Í hesum bólki standa spurningar um læring, undirvísing, uppaling og sosialisering í miðstøðu. Tann lesandi fær innlit í og eina fatan um, hvussu børn og ung ogna sær kunnleika, vitan, fimi, hugburð og áskoðanir í samspæli við umheimin. Hesa vitan og fatan eigur tann lesandi at duga at brúka í næmingalagaðari undirvísing, sum skal kunna fevna um øll børn og ung, t.e. at eitt greitt serundirvísingar- ella næmingalagað perspektiv eigur at vera við í hesum bólki.

Innihaldið í bólkinum eigur at hava eitt virðis- og eitt sosiomentanarligt perspektiv, har fokus ávikavist verður sett á etisk virði, menniskjafatan, samfelagsfatan og sosialar bólkar, fleir-mentanarliga samveru o.s.fr.

Eitt yrkisperspektiv, har fokus verður sett á læraraførleikar, sum eru neyðugir í samveruni og samskiftinum við næmingar, starvsfelagar, foreldur og myndugleikar, kundi hoyrt til henda bólkin, men av tí at hetta perspektivið er partur av bólkinum "at gerast lærari", fær yrkisperspektivið ikki so stóra rúmd í hesum bólki.

Týðandi tema, ella blokkar, í hesum bólki eru:
- Læring og uppaling úr barna- og ungdómsperspektivi
- Læring og uppaling úr skúlaperspektivi
- Samfelag, mentan og útbúgving
- Pedagogisk grundsjónarmið og trupulleikar

Hesin bólkur endar við próvtøku við uttanhýsis próvdómara.

### Bólkur 3: **Føroyskt**

Føroyskt verður felags lærugrein, 20 ECTS í vavi. Tað er krav, at 5 ECTS í hesi lærugrein verða nýtt til grundleggjandi skeið um lesing og skriving.

Móðurmálið er ein meginlærugrein í allari undirvísing og læring og er samstundis týdningarmikil fyri persónligt dannilsi, estetiskar upplivingar og menning og týdningar-mesta samskiftisamboðið í víðari merking, bæði munnliga og skrivliga.

Í fólkaskúlanum er byrjanarlesing og -skriving ógvuliga umráðandi fyri allar næmingar. Kanningar vísa, at trivnaðurin hjá børnum í skúlatíðini er nær tengdur at lesi- og skriviførleikanum: tess fyrr og betur børn læra at lesa og skriva, tess betur trívast tey. Hesir førleikar hava eisini persónligan týdning fyri hin einstaka alt lívið, og tí er avgerandi, at tann lesandi fær góðan undirvísingarførleika í byrjanarlesing og -skriving.

Í hesum bólki eigur tann lesandi at ogna sær grundleggjandi vitan um mál og málnýtslu, skrivliga og munnliga, vitan um tekstir, tekstatulking og ymisk tekstaástøði, um norðurlendsku málini og vitan um lesing og skriving, ástøði um lesing og skriving og frálæruhættir í byrjanarlesingini.

Allir lesandi eiga, bæði ástøðiliga og praktiskt, at menna undirvísingarførleikar og persónligar kompetansur á nevndu økjum.

## Bólkur 4: **Linjugreinir**

Hetta er valfríi parturin, har tann lesandi skal velja fýra linjugreinir, sum hvør fevnir um 30 ECTS. Fyri at kunna velja ávísa linjugrein skal hin lesandi hava prógv á B-stigi, um tað er møguligt, í viðkomandi lærugrein.

Í linjugreinunum hevur tann lesandi møguleika at ogna sær viðkomandi fakligar førleikar og fimi. Tíð er til at hugdýpa seg á nøkrum eksemplariskum økjum, men eisini at ogna sær meira fjøltáttaðan kunnleika til lærugreinina, bæði fakfakligan og fakdidaktiskan. Hetta gevur tí lesandi møguleika at skapa sær eitt gott grundarlag fyri sambinding millum lærugrein, læring og undirvísing.

| | Táttur | Lærugreinir |
|---|---|---|
| A | *Kravdi tátturin* | Støddfrøði, kristni, ítrótt |
| B | *Náttúruvísindaligi tátturin* | Alis-/evnafrøði, lívfrøði, geografi, náttúra og tøkni, KT, heimkunnleiki |
| C | *Hugvísindaligi/samfelagsligi tátturin* | Føroyskt, danskt, enskt, týskt, søga, samfelagsfrøði |
| D | *Musiski/kreativi tátturin* | Myndlist/evning, handarbeiði, smíð, Tónleik |

Lesandi skulu velja minst eina av lærugreinunum í tátti A. Hetta merkir, at lesandi noyðast at velja eina av lærugreinunum, sum ofta verða roknaðar sum flokslærara-lærugreinir í fólkaskúlanum.

Verður bert ein linjugrein vald úr tátti A, skal lesandi velja minst eina lærugrein úr tátti, har valda linjugreinin úr tátti A ikki er umboðað. Velur lesandi fleiri enn ta einu linjugreinina úr tátti A, fellur síðst nevnda kravið burtur.

Linjugreinirnar í hvørjum tátti sær samstarva í minst tríggjar vikur um viðkomandi evni, felags ástøði, háttalag o.a. Hetta merkir, at úr hvørji linjugrein verða á leið 5 ECTS nýtt til felags skeið ella undirvísing. Hetta krav er tó ikki galdandi fyri tátt A.

Linjugreinir skulu í størstan mun verða lisnar í tvær árshálvur, men kunnu tó lesast í upp til fýra árshálvur. Allar linjugreinir skulu enda við próvtøku við uttanhýsis próvdómara. (viðvíkjandi eftirmeting annars, sí brot 3.8).

## Bólkur 5: **Starvslæran**

Endamálið við starvslæruni er, at tann lesandi serstakliga við sjálvsvirksemi arbeiðir við og ognar sær kjarnuførleikarnar í einum framtíðar fólkaskúla:

- evni til nýhugsan (innovatión) og fakligt og sosialt fjølbroytni,
- evni at verkseta (implementera) tankar til veruleika.

Tann lesandi skal sjálvur, við vegleiðing, venja seg til at orða fjølbroyttar undirvísingar- og lærutilgongdir, sum kunnu vera við til at skapa nýhugsan, og teir skulu duga at grundgeva fyri valum sínum.

Innihaldið í starvslæruskeiðunum skal verða stýrt av fakdidaktiskum, náms- og sálarfrøðiligum sjónarhornum og spurdómum. Innan hesar karmar kann tann lesandi sjálvur velja innihaldið í starvslæruskeiðunum. Tó skulu partar av starvslæruni fevna um byrjanarundirvísing og aðrar lærarauppgávur enn undirvísing og læring.

Minst eitt av starvslæruskeiðunum arbeiðir tann lesandi einsamallur, t.e. ikki í bólki. Fyrsta árið fevnir starvslæran m.a. um eygleiðing og luttøku í fjølbroytta virkinum hjá lærarum/flokslærara. Fyri at betra møguleikarnar hjá lærarum Læraraskúlans at vegleiða og minka trýstið á starvslæruskúlarnar, eigur starvslæran sum mest at vera alt árið.

Læraraskúlin ger í hvørjum einstøkum føri avtalu við starvslæruskúlan og -lærara(r) um skipan og innihald í starvslæruni. Starvslæran kann eisini fara fram í øðrum skúlum enn fólkaskúlanum, sum tó skulu vera fólkaskúlanum líkir ella viðkomandi fyri útbúgvingina sum lærari.

Fyri at verða starvslærulærari, krevst starvslærulæraraskeið, ið lærustovnurin skal hava ábyrgd av. Ein onnur treyt fyri at hava lesandi í starvslæru er, at lærarin hevur lærara-útbúgving og minst 2 ára starvsroyndir.

Allir fólkaskúlar, har lærarar við starvslæraraútbúgving starvast, hava skyldu at taka ímóti lesandi í starvslæru.

Til fyrireiking, útinnan og eftirmeting av starvslæruni fær tann lesandi vegleiðing frá bæði lærarum Læraraskúlans og starvslæraranum. Lutfallið millum samrøðutímar við starvslærara(r) og starvslærutímar kann t.d. vera 1 til 8.

Hvørt starvslæruskeið ger starvslærarin eina skrivliga og grundgivna meting av tí lesandi. Skrivliga frágreiðingin skal enda við eini meting um, í hvønn mun tann lesandi kann ætlast at roynast sum lærari. Tann lesandi fær høvi at lesa frágreiðingina. Tann lesandi skal eisini lata inn og leggja fram frágreiðing um starvslæruskeiðið. Báðar frágreiðingarnar verða partar av dømingini um, hvørt tann lesandi hevur staðið starvslæruna ella ikki.

## Bólkur 6: **Bachelorbólkurin**

### *Vísindaástøði og háttalagslæra*

Til tess at menna akademiska lestrarførleikan hjá tí lesandi verður kravt, at tann lesandi tekur eitt skeið í háttalagslæru á 5 ECTS og eitt skeið í vísindaástøði somuleiðis á 5 ECTS.

Tann lesandi skal eisini arbeiða við m.a. grundleggjandi spurningum í háttalagslæru og vísindaástøði sum:

- partloysi (objektivitetur), virði og ávís áhugamál,
- fatan og frágreiðing,
- empiri og dátur,
- ástøði og praksis,
- kvantitativt/kvalitativt háttalag,
- induktivt/deduktivt háttalag,
- verkætlanararbeiði.

Harumframt skal tann lesandi kenna og arbeiða við ymiskum vísindaátøðiligum stevnum (rætningum) sum positivismu, fænomenologi, hermeneutik, strukturalismu o.s.fr. Í bachelorverkætlanini er krav um, at tann lesandi skal sýna førleika at nýta vísindaligt ástøði og háttalag, og tí er skeiðið í vísindaástøði og háttalagslæru knýtt at bachelor–bólkinum.

### *Bachelorverkætlanin*

Bachelorverkætlanin fevnir um 20 ECTS. Henda verkætlan verður í høvuðsheitum skrivað 8. lestrarhálvu. Bachelorverkætlanin er skrivlig við eini munnligari framløgu og kann skipast sum ein einstaklings- ella bólkaverkætlan. Próvtøkuhátturin skal tryggja, at dømingin verður framd fyri hvønn einstakan lesandi sær. Sí eisini brot 3.4.

Bachelorverkætlanin verður skrivað í tilknýti til eina av valdu linjugreinunum og/ella námsfrøði/sálarfrøði, og kann eisini verða knýtt at starvslæruni. Tann lesandi velur sjálvur, í samráði við vegleiðara, evnið, sum endaliga skal góðkennast av rektaranum.

Bachelorverkætlanin skal vera viðkomandi fyri alla útbúgvingina, so at hon knýtir fakfakliga vitan, didaktikk/námsfrøði/sálarfrøði, og møguliga starvslæru saman í eina eind og samstundis lítur frameftir móti praktiska lærarayrkinum. Yvirskipað er ætlanin við verkætlanini, at hon skal skapa eina eind viðvíkjandi útbúgvingini, geva tí lesandi møguleika at hugdýpa seg í relevant viðurskifti og savna teir ymsu træðrirnar, sum

útbúgvingin fevnir um. Tann lesandi skal eisini prógva evni at nýta vísindaligt ástøði og háttalag í bachelorverkætlanini.

Vegleiðarar eru lærarar í teimum viðkomandi lærugreinunum. Verkætlanin verður dømd av lærara í viðkomandi lærugrein, námsfrøði-/sálarfrøðilærara og uttanhýsis próvdómara, sum er settur av Mentamálaráðnum. Verkætlanin verður dømd eftir galdandi próvtalsstiga smbært kunngerð um próvtøku.

## 5.5 Dømi um bólkabýti á árshálvur

Niðanfyri er eitt dømi um, hvussu teir ymsu bólkarnir kundu verið skiftir á tær 8 árshálvurnar í læraraútbúgvingini. Dentur skal leggjast á, at talan er um eitt dømi, so tað er ikki sagt, at býtið verður, sum víst á talvuni. Men grundleggjandi er tankin, at grundgreinirnar, námsfrøðin/sálarfrøðin og partar av starvslæruni í stóran mun skulu liggja tíðliga í útbúgvingini, meðan linjugreinirnar og bachelorverkætlanin liggja seint og í høvuðsheitum tær seinastu 4 árshálvurnar. Við slíkum býti hevur tann lesandi størri møguleika at savna seg um arbeiðið, tí hann hevur ikki so nógvar lærugreinir samstundis.

Tað er ein fyrimunur at lesa bólkarnar "at gerast lærari" og námsfrøði/sálarfrøði tíðliga í útbúgvingini, tí hesir bólkar eru við til at leggja eitt námsfrøðiligt og didaktiskt grundstøði, sum linjugreinirnar hava fyrimunir av í sambandi við fakdidaktikkina. Hóast bólkarnir "at gerast lærari" og námsfrøði/sálarfrøði eru tíðliga í útbúgvingini – og linjugreinirnar seint – merkir hetta ikki, at námsfrøðin/sálarfrøðin verður loyst frá vanligum lærugreinum, tí grundgreinirnar eru eisini í byrjanini av útbúgvingini.

| | 1. árið | | 2. árið | | 3. árið | | 4. árið | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1. hálva | 2. hálva | 3. hálva | 4. hálva | 5. hálva | 6. hálva | 7. hálva | 8. hálva | ECTS tils. |
| "At gerast lærari" | 10 | 10 | | | | | | | 20 |
| Námsfrøði/sálarfrøði | 5 | | 5 | | | 10 | | 5 | 25 |
| Føroyskt | 5 | 5 | 10 | | | | | | 20 |
| Linjugrein a | | 15 | 15 | | | | | | 30 |
| Linjugrein b | | | | 15 | 15 | | | | 30 |
| Linjugrein c | | | | 15 | 15 | | | | 30 |
| Linjugrein d | | | | | | 15 | 15 | | 30 |
| Starvslæran | 5 | | | | | 5 | 10 | 5 | 25 |
| Bachelorbólkurin | 5 | | | | | | 5 | 20 | 30 |
| | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 | 30 | 240 |

☐



# 6 Lærustovnurin

Í okkara grannalondum eru lærara- og partvíst pedagogútbúgvingar akademiskar útbúgvingar, ið fara fram á universitetum ella øðrum hægri lærustovnum á universitets-støði. Útbúgvingarnar eru skipaðar bæði sum granskingar*grundaðar* bachelorútbúgv–ingar, kandidatútbúgvingar og granskaraútbúgvingar (sí eisini 2.2 og 2.3). Í Danmark eru lærara- og pedagogútbúgvingarnar sonevndar professiónsbachelorútbúgvingar, ið hava granskingar*tilknýti*, og fara fram á seminarium.

Vitan og kunnleiki eru loysunarorð til menning og framburð, og tí er tørvur á fleiri akademiskum útbúgvingum, bæði til at manna almennu stovnarnar, skúlar, granskingar-stovnar o.fl. Harumframt er størri akademisk útbúgvingarskipan enn higartil neyðug fyri at manna framtíðar fyritøkur og virki, sum skulu fara undir at framleiða vørur og tænastur, sum stór vitan og nógvur kunnleiki krevst til. Til tess at tryggja somu dygd og javnt vav í akademisku útbúgvingunum er neyðugt at umhugsa, hvussu tær kunnu samskipast. Hartil kemur, at hetta er rákið um alt Evropa.

Pedagogiska økið er vorðið alt meira víttfevnandi og margfalt, og sera stórur tørvur er á gransking á økinum serliga við einum føroyskum perspektivi. Tann vitan, ið er grundarlagið undir útbúgvingunum og praksisøkjunum, er oftast bygd á útlendskar keldur. Tað er als ikki altíð, at somu viðurskifti gera seg galdandi í Føroyum sum á teimum støðum, haðani vit fáa okkara vitan frá. Á lærustovninum eigur tí pedagogisk gransking á heimligari grund at fara fram, skulu okkara útbúgvingar mennast og standa mát við samsvarandi útbúgvingar í grannalondunum.

Akademiskar útbúgvingar, t.e. bachelor, master (kandidat) og ph.d.útbúgvingar, eru sermerktar av, at undirvísingin er granskingargrundað, og at lærarar skulu hava granskingarførleika og granskingarroyndir. Higartil hava akademiskar útbúgvingar í Føroyum verið givnar á Fróðskaparsetrinum, og í 2003 tók Sjúkrarøktarfrøðiskúlin inn fyrstu lesandi til føroysku bachelorútbúgvingina í sjúkrarøktarfrøði. Við støði í m.ø. hesum áliti er ætlanin eisini at gera pedagog- og lærarútbúgvingarnar í Føroyum til bachelorútbúgvingar.

## 6.1 Føroyskur lærdur háskúli

Tosað hevur í fleiri ár verið um at skipa ein føroyskan lærdan háskúla (universitet), ið skal fevna um allar teir lærustovnar, ið bjóða út akademiskar útbúgvingar. Í løgtinginum er ført fram, at landið og akademiska/lærda umhvørvið er ov lítið til at hava fleiri lærustovnar, ið hava útbúgvingar á akademiskum stigi. Tað er skilabetri at hava ein sterkan akademiskan lærustovn heldur enn fleiri smáar. Hetta var eisini staðfest í lóggávuni frá 2003 um bachelorútbúgving til sjúkrarøktarfrøðing, har Føroya Løgting ásetti, at allar akademiskar útbúgvingar skulu skipast undir einum føroyskum lærdum háskúla.

Við støði í omanfyri nevnda hevur landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, byrjað eina tilgongd við at leggja saman teir lærustovnar, ið bjóða út akademiskar útbúgvingar. Tilgongdin byrjaði, tá ið landsstýrismaðurin við tíðindaskrivi 23. november 2005 boðaði frá, at lærustovnarnir Fróðskaparsetur Føroya og Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya frá 1. januar 2006 formelt fóru at verða samskipaðir við tí fyri eyga at leggja stovnarnar saman í ein lærdan háskúla.

Viðvíkjandi samskipan og samanlegging av Fróðskaparsetrinum og Føroya Læraraskúla boðaði landsstýrismaðurin frá, at tað ikki varð mett skilagott at leggja stovnarnar saman, áðrenn nýggj lóg fyri Læraraskúlan er komin í gildi; men at ætlanin er at leggja stovnarnar saman, tá ið útbúgvingarnar á bachelorstigi eru komnar í gildi, allarhelst um eini tvey ár.

Arbeitt verður nú við at orða eitt lógarverk fyri ein føroyskan lærdan háskúla, og verða Fróðskaparsetur Føroya og Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya endaliga lagdir saman, tá ið lóggávan er komin í gildi.

Ein orsøk til, at neyðugt er við nýggjari lóggávu fyri samanløgdu stovnarnar, er eisini, at meðan Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya og Føroya Læraraskúli eru almennir stovnar, er Fróðskaparsetur Føroya ein sjálvsognarstovnur. Tað eru sostatt eisini yvirskipað, bygnaðarlig viðurskifti, sum skulu fáast upp á pláss, áðrenn talan kann verða um formliga samanlegging.

Nú arbeiðið við at samskipa hægru lærustovnarnar er byrjað, er neyðugt at taka hædd fyri, at mentanirnar á stovnunum eru so ymiskar, at tað tekur tíð at byggja upp eitt fruktagott samstarv. Hetta eru eisini royndirnar úr øðrum londum, har stovnar eru samanlagdir. Sum dømi kundi Ísland verið nevnt, har tað hevur tikið mong ár at leggja Háskóla Íslands (universitetið) og Kennaraháskóla Íslands (læraraskúlan) saman.

## 6.2 Førleikamenning

At Føroya Læraraskúli fer at bjóða útbúgvingar á bachelorstigi, setur ávís krøv til Læraraskúlan sum lærustovn. Her verður serliga hugsað um førleikakrøv til lærararnar. Neyðugt er, at lærarar hava fakligar førleikar á akademiskum stigi, eins og at námsfrøðiligir førleikar, granskingarførleikar og samstarvsførleikar eru ein fortreyt hjá einum lærara á hægri lærustovni. Í Norðurlondum skula lærarar, ið undirvísa á bachelorstigi, hava kandidatútbúgving frá universiteti umframt didaktiskar og fakdidaktiskar førleikar (annaðhvørt sum partur av kandidatútbúgvingini ella sum pedagogisk ískoytis útbúgving). Somu krøv eiga at setast lærarunum á føroyska lærda háskúlanum.

Tey næstu 5-6 árini skal arbeiðast miðvíst við, at lærarar á Læraraskúlanum fáa møguleika at vinna sær granskingarførleika, so at vísindaliga støðið á stovninum hækkar, og at dygdin í útbúgvingunum verður tryggjað. Í hesum sambandi er neyðugt, at lærarar Læraraskúlans fáa høvi at granska og at eftirútbúgva seg gjøgnum alt starvstíðarskeiðið við góðum starvsligum/arbeiðsligum og fíggjarligum treytum.

Henda framhaldandi førleikamenning av starvsfólkum hevur alstóran týdning og er beinleiðis fyritreyt fyri at menna og fyrireika stovnin til at bjóða kandidatútbúgvingar innan 5-10 ár (sí eisini brot 6.6). Í hesum sambandi kann nevnast, at í okkara grannalondum verður alsamt arbeitt við at hækka akademiska støðið, t.d. verður í løtuni arbeitt við at broyta íslendsku lærarаútbúgvingina frá at vera bachelor- til at vera kandidatútbúgving, eins og í Finnlandi.

## 6.3 Gransking

Mælt verður til at skipa eina felags granskingarkvotuskipan fyri t.d. Føroya Læraraskúla og Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya. Granskingarkvotan kann í krónum svara til ávísan prosentpart av lønunum hjá lærarum við kandidatútbúgving og ávísan prosentpart av lønunum hjá lærarum við granskaraútbúgving. Lærarar kunnu síðani søkja lærustovnin um at sleppa at granska eitt nú hálva ella fulla tíð í avmarkað tíðarskeið. Lærustovnurin skal kunna gera av, hvørji fakøki stovnurin ynskir, at lærarar granska í, og játta lærarum/granskarum granskingartíð samsvarandi raðfestu granskingarøkjunum.

Granskingarkvotuskipanin kann eisini nýtast soleiðis, at krav er um, at allir lærarar innan raðfestu granskingarøkini skula hava ávísa mongd av gransking innan eitt ásett tíðarskeið. Umhugsast kann eisini eitt krav um, at lærarin skal arbeiða við sínum fakøki í fólkaskúlahøpi, t.d. kann ein lærari á Læraraskúlanum undirvísa einum flokki í fólkaskúlanum ella arbeiða á einum pedagogiskum stovni minimum ½ ár í einum tíðarskeiði á t.d. 5 ár. Møguliga kundi hetta verið gjørt sum partur av eini granskingarverkætlan.

Mælt verður til at arbeiða við at skipa lærarastørvini sum fulltíðarstørv við vanligari (40 tíma) arbeiðsviku, har lærustovnurin bjóðar starvsfólkunum nøktandi arbeiðsumstøður á staðnum.

## 6.4 Eftirútbúgvingardeild

Ein alsamt meira broytilig verð krevur, at allir yrkisbólkar støðugt hava møguleika til eftirútbúgving og víðari lestur. Tað er tí neyðugt at skipa eina serstaka eftir- og víðari-útbúgvingardeild á Læraraskúlanum til at standa fyri og samskipa eftir- og víðari-útbúgving á undirvísingarliga og øðrum viðkomandi økjum.

Stovnurin skal bjóða lærarum og pedagogum, sum eru í starvi, at fylgja linjugreinum ella bólkum, blokkum og kubbum, sum ein samskipaður partur av neyðugu eftirútbúgvingini hjá hesum starvsbólkum.

Stovnurin eigur eisini at bjóða út serstøk eftirútbúgvingarskeið, t.d. starvslærulæraraskeið og ymisk faklig og námsfrøðilig skeið, ið eru viðkomandi fyri fólkaskúlalærarar, pedagogar, skúlar, stovnar o.o.

Harumframt skal stovnurin menna eina skipan, sum tryggjar lærarum og pedagogum við eldri prógvum møguleika at lesa víðari til tess at uppstiga eldru prógvini til bachelor-prógv. Hetta eigur at verða gjørt, samstundis sum nýggja útbúgvingin verður sett í verk, so treytir og reglur eru greiðar frá byrjan.

Eftirútbúgvingardeildin verður víðkað til at umfata øll øki, tá ið Læraraskúlin, Sjúkra-røktarfrøðiskúlin og Fróðskaparsetrið eru løgd saman í ein stovn.

## 6.5 Skiftisskipan

- **Skiftisskipan fyri lærustovnin**

Tá ið nýggju útbúgvingarnar byrja, fer undirvísingin á stovninum fram eftir tveimum námsskipanum, tí gomlu og tí nýggju, samstundis. Gamla námsskipanin er í vissan mun eyðkend av vikutímum á tímatalvuni, t.v.s. at í hvørji lærugrein verða lisnir so og so nógvir tímar hvørja viku í skúlaárinum (í ársætlanini eru tó nakrar vikur við broyttari tímatalvu við tvørgangandi verkevnum, temum o.s.fr.). Nýggja námsskipanin leggur harafturímóti upp til, at arbeitt verður í samanhangandi tíðareindum í hvørji lærugrein sær. Hetta kemur at merkja, at 1. árs bachelorlesandi fer at hava eina aðra námsskipan enn hinir árgangirnir á stovninum, ið fylgja gomlu lógini.

Fyri lærustovnin kann tað gerast trupult at samskipa hesar báðar skipanirnar serliga á økjum, har ein ella fáir lærarar undirvísa, tí ávís tíðarskeið kemur lærarin at undirvísa konsentrerað við 1. árs bachelorlesandi, samstundis sum hann kann hava bindingar á tímatalvuni við hinum árgangunum sambært gomlu lógini.

Vanliga lesa tveir árgangir av lærarallesandi saman í linjugreinunum. Hetta til tess at økja um valmøguleikarnar av so nógvum linjugreinum sum møguligt (læraraskúlin hevur samfelagsskyldu at bjóða allar lærugreinir fólkaskúlans út). Tað ber illa til at samskipa

gomlu og nýggju skipanina, so at annar árgangurin – ið hvussu er partvíst – lesur eftir tímatalvu við vikutímum, meðan hin lesur eftir námsskipan við konsentreraðum, samanhangandi tíðareindum. Tí verður trupult at uppfylla samfelagsskylduna at bjóða út nóg nógvar lingjugreinir.

Ein møguleiki at loysa hesar og líknandi trupulleikar kundi verið at góðtikið, at tann eini læraraárgangurin, ið lesur eftir nýggju skipanini, einsamallur velur seg inn á linjuhold, sum av somu orsøk vera smá (fáir lesandi og ikki so nógvir valmøguleikar). Hinir árgangirnir gera seg lidnar eftir gomlu skipanini. Helst verður neyðugt við eyka læraratímum, evt. lisnir við eksternari hjálp, so henda loysn verður nakað dýrari og fer tí at ávirka fíggjarviðurskiftini nakað í skiftistíðini.

Ein annar møguleiki er at steðga við upptøku av lesandi eitt ár, og síðani taka 40-50 lesandi inn árið eftir til hvørja útbúgvingina. So nógvir lesandi samstundis seta stór krøv til hølisviðurskifti skúlans, sum frammanundan ikki eru ov góð, men fyrimunirnir eru eisini eyðsýndir. Læraralesandi fáa við hesi loysn fleiri valmøguleikar til linjugreinirnar, tí tað vera fleiri lesandi, sum skulu velja linjugreinir. Eisini hevur henda loysnin stórar fyrimunir fyri lærustovnin í sambandi við gerð av nýggjari kunngerð og námsskipan fyri útbúgvingarnar. At hava færri lesandi á skúlanum hetta eina árið gevur lærarum og leiðslu skúlans betri tíð miðsavna seg um at skriva kunngerð og námsskipan.

- **Uppstiging til bachelor**

Tað er umráðandi at bjóða teimum, sum eru útbúgvin eftir eldru skipanini, eina uppstigan, har møguleiki er at fáa próvbrævsheitið broytt til bachelor. Uppstiganin kann skipast sum ískoytislestur svarandi til tey krøv, ið báðar útbúgvingarnar seta til bachelorverkætlanina. Bachelorverkætlanin, vísindaástøði og háttalagslæra verða fevnd av somu krøvum sum til lærara- og pedagogútbúgvingarnar annars.

## 6.6 Kandidatútbúgvingar

Mælt verður til, at vit í Føroyum, eins og t.d. í Íslandi, seta okkum sum mál, at lærara-útbúgvingin innan 5-10 ár verður ein 5 ára long kandidatútbúgving. T.v.s. at fólkaskúlalærarar ikki eru liðugt útbúnir, fyrr enn teir hava bachelorútbúgvingina á 3 ár og kandidatútbúgvingina á 2 ár.

Mælt verður eisini til, at pedagogútbúgvingin verður skipað bæði við eini bachelor-útbúgving (generalistútbúgving) og eini kandidatútbúgving á viðkomandi (ser)økjum. Á kandidatútbúgvingini skal sostatt verða møguligt at lesa sergreinir innan pedagogiska økið soleiðis, at tann útbúni pedagogurin hevur møguleika fyri at serkunna seg sum framhald av teirri almennu bachelorútbúgvingini.

Skal stovnurin verða klárur at bjóða slíkar kandidatútbúgvingar út um 5-10 ár, er neyðugt, at byrja tilgongdini við víðariútbúgving av lærarum stovnsins beinanvegin (sí brot 6.2).
☐

# SKJAL 1

## Dømi um ein *bólk* í læraraútbúgvingini: Linjugreinin landalæra

Hesin bólkur er uppá 30 ECTS, t.v.s. uml. 20 arbeiðsvikur, og skal lesast yvir tvær lestrarhálvur ella eitt lestrarár (tað er ikki sagt, at allir bólkar skulu lesast uppá so stutt tíðarskeið). Hetta merkir, at “bólkurin” (linjugreinin í hesum føri) verður lisin eitt tíðarskeið uttan at ov nógvar aðrar bólkar verða lisnir samstundis. Hetta gevur betri møguleikar til at skapa eind í “bólkin”, tí tann lesandi kann halga seg um tann eina bólkin. (Í verandi skipan er ikki óvanligt at hin lesandi hevur fleiri enn 5-6, og upp í 10, lærugreinir samstundis.)

Ein annar fyrimunur við at lesa eina linjugrein uppá eitt ár er, at tað er lættari at skipa eftirútbúgving fyri lærarar – har teir t.d. fylgja eini linjugrein ella bólki, blokki ella kubba – í eitt ávíst samanhangandi tíðarskeið.

Ikki minst kann tað vera stórur fyrimunur at kunna eftirmeta antin hvønn blokkin ella kubban sær, so eftimeting gerst ein meira natúrligur partur av dagligu undirvísingini og ikki bert ein dómur yvir samlaða avrikið fyri allan bólkin (linjugreinina, felags-lærugreinina, tema ella annað).

Bólkurin ’Landalæra sum linjugrein’ verður býttur sundur í 5 blokkar (ofta saman-hangandi tíðarskeið), sí yvirlit niðanfyri. Blokkarnir verða so aftur býttir í kubbar (styttri tíðareindir). T.d. hevur blokkurin “jarðfrøði” í hesum døminum 6 kubbar.

Avgerandi er, at tað altíð er pláss til at draga bæði fakfakligheit, fakdidaktikk og (evt.) starvs¬læru inn í undirvísingina, óansæð um talan er um blokkar ella kubbar. Harumframt eigur at leggjast upp til samstarv millum ymiskar bólkar. T.d. kundi kubbin “Sólarskipanin” verið lagdur soleiðis tilrættis, at samstarv var millum geografi og alisfrøði. Ella partar av blokkinum “demografi”, t.d. kubbin um hagfrøði, kundu verið eitt samstarv millum geografi og støddfrøði.

| Bólkur | Blokkar | Kubbar |
|---|---|---|
| Linjugreinin landalæra<br><br>30 ECTS | ▪ Jarðfrøði (geologi) og tilfeingi | ▪ Sólarskipanin (kann leggjast samstundis sum alisfrøði hevur evnið á skránni)<br>▪ Plátutektonikk<br>▪ Geologiski strukturur jarðar og Føroya jarðfrøði<br>▪ Geografi sum náttúruvísindi, metodur o.a.<br>▪ Vulkanisma<br>▪ Ytri geologiskar prosessir (máing o.s.fr.) |
| | ▪ Havið, veðurlag og gróður | ... |
| | ▪ Demografi | ▪ Hagfrøði<br>▪ Urbanisering<br>... |
| | ▪ Vinnugeografi | ... |
| | ▪ Politisk geografi | ... |

Ein møguleiki var, at natúrgeografiin varð lisin í 10 samanhangandi vikur í fyrru lestrarhálvu, meðan kulturgeografiin varð lisin samanhangandi 10 vikur í seinnu lestrarhálvuni.

## Arbeiðsháttur

Skift verður millum fyrilestrar, floksundirvísing, venjingar og verkætlanararbeiði. Kravt verður, at hin lesandi skal skriva 3 verkætlanir, sum skulu eftirmetast. Allir kubbar kunnu eisini eftirmetast. Eftirmetingarnar verða gjørdar innanhýsis, tó skal minst 1 verkætlan eftirmetast við uttanhýsis próvdómarum. Í sambandi við verkætlanirnar kann starvslæra verða drigin uppí.

☐

# SKJAL 2

## Um læraraútbúgvingarnar í Norðurlondum

Yvirlitstalvan á næstu síðu vísir stuttan samandrátt um læraraútbúgvingarnar* í Norðurlondum. Útbúgvingarnar eru rættiliga ymiskar, eitt nú speglast munir í bygnaðurin í fólkaskúlaskipanunum aftur í ymsum krøvum og førleikum til lærararnar.

Í yvirlitinum eru vald hesi eyðkenni: *útbúgvingarstøði*, vanlig *útbúgvingartíð*, *upptøkukrøv*, *slag av útbúgvingarstovni* og *krøv til læraraførleiki*, útbúgvingarinnihald, spesialisering og starvslæra brúkast.

### *Breiða mótvegis smalari undirvísingarkompetansu*

Í flestu londunum hava lærararnir eina breiða undirvísingarkompetansu á lægru floksstigunum, "primary school". Á "lower secondary"-floksstigunum (vanliga frá 4./6.–9. flokk) serútbúgva lærarar seg í færri lærugreinum ella lærugreinaøkjum. Tað er eitt sindur ymiskt frá landi til land hvussu nógvar lærugreinirnar eru, men vanliga 2–3 lærugreinir.

### *Stigbýtt mótvegis eindarútbúgving*

Í summum londum (t.d. í Føroyum og Danmark) er læraraútbúgvingin ein eindarútbúgving, har lærarin kann undirvísa 1.–10. flokk. Í øðrum londum er læraraútbúgvingin stigbýtt í samsvari við bygnaðin í fólkaskúlaskipanini.

---

*Pedagogútbúgvingar eru ikki tiknar við í yvirlitinum; tær eru uppaftur meiri ymisligar í hesum londum enn læraraútbúgvingarnar. Undantikið Danmark og Føroyar er í stóran mun talan um spesialiseringar til ávís øki, t.d. normaløkið ella sosialpedagogiska økið, meðan útbúgvingin í Danmark og Føroyum meira er ein generalistútbúgving. Afturat hesum kemur, at útbúgvingarnar eru á ymiskum støði, frá at vera ein miðnámsútbúgving í summum førum til kandidatútbúgving í øðrum førum.

## Lærarautbúgvingar í Norðurlondum

| Land | Grund- og miðnámsskúli | Útbúgvingarstovnur | Longd á útbúgving | Undirvísingarførleiki | Starvslæra í útbúgvingini |
|---|---|---|---|---|---|
| **Finnland** | 9 ára kravd skúlagongd og er hon sundurbýtt í ávikavist 1.-6. og 7.-9. flokk.<br>Miðnámsútbúgving tekur 3 ár. | Lærarautbúgving fer fram á universitetum á *Faculty of education* við granskingartilknýti (námsfr.) | Fyri at undirvísa í 1.-6. fl. skal man lesa eina kandidatútb. 3+2 ár. Lærarar sum undirvísa frá 7. fl. og uppeftir skulu harumframt taka pedagogikum (1 ár). Faklærarar kunnu hava eina bachelor-útb. á einum øki kombinera við kandidatútb. í námsfrøði. | *Flokslærarar*: Lærarar við kandidatútb. og undirvísa í øllum lærugreinum í 1.-6. flokk.<br>*Faklærarar:* Lærarar, ið undirvísa í einum ella tveimum lærugr. í 7.-9. flokki og í miðnámsskúlum. | Starvslæran fer fram á serligum starvslæruskúlum knýttir at universi-tetinum ella á kommunalum skúlum ella miðnáms-skúlum. Tað ber til at taka starvslæruna aftaná, at tann lesandi hevur staðið ástøðiliga partin. |
| **Noreg** | Grundskúlin er frá 1.-10. flokk. Hann er býttur í 3 stig:<br>1.-4. fl., 5.-7. og 8.- 10 flokk.<br>Miðnámsútbúgving tekur 3 ár. | Universitet og "høgskoler"/ (seminarium) | Tað eru 3 lærarautbúgvingar: ein almenn (4 ár) og tvær faklærarautbúgvingar (3 ár), ávikavist ein serlærarautb. og faklærarautb. sum eru vendar móti arbeiðsmarknaðarútbúgvingunum. Harumframt kann man taka eina masterútb. við námsfrøði integreraðari í útb. (5 ár). Sum ískoyti til lærarautb. ella eina vinnuútb. finst ein 1-árs praktisk-pedagogisk útb. at byggja omaná (PPU). | Tann almenna lærarautb. gevur undirvísingar-kompetansu í 1.-10. fl. Um hin lærarالesandi velur fleiri lærugr. kann hann málrætta sína útb. móti teimum "yngru" flokkunum, meðan hann við at velja færri lærugreinar kann venda sær móti "eldru" flokkunum. Faklærarautb. gevur kompetansu í teimum tiknu lærugr. (oftast á einum stigi). PPU kvalifiserar lærarar við bak-grund í eini vinnu-útb. at undirvísa í 5.-10. fl og miðnámsútb. umframt undirvísing fyri vaksnum. | Starvslæran í almennu lærarautb. er 20-22 arbeiðsvikur og í faklærarautb. 12-14 arbeiðsvikur býtt sundur í fleiri tíðarskeið. Starvslæran fyri PPU er annaðleiðis. |
| **Svøríki** | 9 ára kravd skúlagongd. Bygnaðurin í fólkaskúlanum er ymiskur í ymsum landspørtum. Í mongum kommunum hevur man ein tríbýttan skúlastruktur. Allar ungdómsútbúgvingar eru "gymnasialar". | Háskúlar og universitet. | Man hevur eitt felags modul fyri allar lærarautb. í námsfrøði, didaktikk og serundirvísing.<br>Grundskúlalærarar (yngstu flokkarnir) 3½ ár.<br>Grundskúlalærarar (eldru flokkarnir) 4½ ár.<br>Miðnámslærarar 4½ ár. | Lærararnir serútbúgva seg í fakum ella fakøkjum. Vanligt er at man lesur fleiri ávís øki til tess at undirvísa í mongum fakum í yngru flokkunum, meðan man specialiserar seg í einkultum (fáum) fakum til tess at undirvísa í eldru flokkunum. | Tað eru ikki fastar reglur fyri vavið av starvslæruni; er ymiskt frá landsluti til landslut. Tað eru teir einstøku stovnarnir, sum sjálvir gera av hvussu umfatandi starvslæran skal vera. |
| **Danmark** | 9 ára kravd skúlagongd. Men tað stendur øllum í boði at fara í forskúla og at taka eitt 10. skúlaár eisini. | Lærarar verða útbúnir á seminarium, sum í dag oftast eru savnaði í størri eindir, nevndar CVU *Center for Videregående Uddannelser*. | Lærarautbúgvingin verður lisin uppá 4 ár (240 CTS). Útbúgvingin hevur 4 linjulærugreinir og nakrar fáar felagslærugreinir (kristendomskund-skab/livsoplysning, almen didaktik, psykologi, pædagogik og skolen i samfundet). Harumframt eina bacheloruppgávu og starvslæru. | Lærarautbúgvingin gevur starvsheitið: *Professionsbachelor som folkeskolelærer*. Á enskum er heitið: *Bachelor of Education*. Útbúgvingin gevur rætt til at undirvísa í øllum fólkaskúlanum. | Vavið á starvslæruni var 24 ECTS, men er nú vaksið til 36 ECTS. Í stóran mun verður starvslæran lisin í fólkaskúlanum, men eisini í øðrvísi skúlum. |
| **Ísland** | 10 ára kravd skúlagongd | Læraraskúli ella universitet. | Lærarar sum undirvísa í grundskúlanum, 1.-7. fl., verða útbúnir sum "eindarlærarar" á læraraskúlum (kennaraháskúlum). Henda útbúgving tekur 3 ár, men kann lesast sum fjarlestur í 4 ár.<br>Av lærarum, sum undirvísa í 8.-10. flokkunum, verður kravt, at teir hava eina BA- ella BS-útbúgving og síðani lesa eitt ár afturat á universitetinum, í serligum førum bert eina lestrarhálvu. | Í grundskúlanum, 1. – 7. flokki undirvísir sami lærari ofta í flestu lærugreinum. Men í 8.-10. flokki undirvísir ein lærari vanliga í einstøkum lærugreinum. | |

# SKJAL 3

## Tilvísingar til heimasíður við tilfari um lógir, kunngerðir o.a.

| Land | Lógar- og kunngerðar-grundarlag o.a. | Heimasíðuadressa |
|---|---|---|
| Danmark | Kunngerð fyri læraraútbúgving | www.retsinfo.dk/_GETDOCM_/ACCN/B19980038205-REGL |
| Danmark | Ískoytiskunngerð fyri læraraútbúgving | www.retsinfo.dk/DELFIN/HTML/B2001/0069505.htm |
| Danmark | Kunngerð fyri pedagogútbúgving | www.hsem.dk/Censorservice/paedudd/BEK93008121997.asp |
| Danmark | Ískoytiskunngerð fyri pedagogútbúgving | www.hsem.dk/Censorservice/paedudd/BEK70623072001.asp |
| Noreg | Rammeplan (kunngerð) fyri bæði pedagog- og læraraútbúgving | www-lu.hive.no/rammeplan_larer.htm |
| Svøríki | Utbildningsplan (Universitetini hava lokalar “kunngerðir”). Her dømi frá universitetinum í Malmø. | www.mah.se/upload/LUT/Utbildning/Utbplan%2001.pdf#search=%22L%C3%A4rarutbildningen%20%2B2001-08-31%20%2Butbildningsplan%22 |
| Svøríki | Læraraútbúgvingin í Malmø | www.mah.se/templates/Page____149.aspx |
| Finland | Lýsing hjá donskum seminarii-lærara av finsku læraraútbúgvingini | www.kdassem.dk/publicer/kalejdo/96/kal96-05.htm |
| Ísland | Rit um útbúgvingar-skipanina í Íslandi | bella.stjr.is/utgafur/skoldanska.pdf#search=%22island%20%2Bl%C3%A6reruddannelse%22 |
| Ísland | Læraraskúlin í Íslandi | www.khi.is/ |
| Føroyar | Lóg og kunngerð fyri pedagog- og lærara-útbúgving á heimasíðu Læraraskúlans | www.flsk.fo |
|  | Um Bologna-yvirlýsingina, ECTS v.m. | www.ciriusonline.dk/ects |

# SKJAL 4

## Limirnir í arbeiðsnevndini

*Petur Zachariassen*, lektari á Fróðskaparsetri Føroya (formaður)

*Kristianna Sjóvará Jacobsen*, fulltrúi í Mentamálaráðnum (skrivari)

*Mikkjal Mikkelsen*, lærari á Føroya Læraraskúla (skrivari)

*Pauli Nielsen*, rektari á Føroya Læraraskúla

*Anna Gásadal*, lærari á Føroya Læraraskúla

*Høgni á Reynatrøð*, læraralesandi

*Guðrun Hansen*, pedagoglesandi

*Jóhanna Hansen*, pedagogur umboðandi Almannamálaráðið

*Malan Marnersdóttir* / *Jóan Pauli Joensen*, rektarin á Fróðskaparsetri Føroya

*Jenny Lydersen*, undirvísingarleiðari í Mentamálaráðnum

*Magnus Tausen*, formaður í Føroya Lærarafelag

*Gunnvá Dam*, lærari umboðandi Føroya Lærarafelag

*Óli Midjord*, pedagogur umboðandi Føroya Pedagogfelag

*Elida Poulsen*, pedagogur umboðandi Føroya Pedagogfelag

*Rógvi Thomsen*, skrivari í Magistarafelagi Føroya